# Føroya Arbeiðsgevarafelag
# Ársfrágreiðing 2014

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Vinnuhúsið
Óðinshædd 7
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn

# Frágreiðing frá nevndini

Staðfestast kann, at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum frá føroysku vinnuni veruliga hevur tikið seg uppaftur.

Arbeiðsloysið er fallið nógv, í mun til tá tað var hægst, og er nú 3,1 % í mun til 4,3 % somu tíð í fjør. Hetta er gott, men tað vísir seg at vera torført serliga at fáa fatur á røttu arbeiðsmegini til handverksvinnuna, men eisini á tekniskum starvsfólki til aðrar partar av vinnuni.

Um hugt verður eftir lønarútgjaldingum í 2014 í mun til 2008 sæst, at lønarútgjaldingarnar frá vinnuni nú eru góðar 200 mió. kr. hægri, enn tær vóru í 2008, meðan lønarútgjaldingarnar hjá tí almenna eru hækkaðar við 450 mió. kr. síðan 2008.

Verður hugt nærri eftir tølunum sæst, at enn eru lønargjaldingarnar frá byggivinnuni, handilsvinnuni og fíggjarvinnuni ikki komnar upp á sama støði, sum tær vóru í 2008.

Fiskiveiða, alivinna og shippingvinnan hava tó havt vøkstur í lønarútgjaldingum. Innan tað almenna er vøkstur í lønargjaldingunum á øllum økjum, men serliga eru tað kommunur og ríkisstovnar, sum hava havt stóran vøkstur í lønargjaldingum.

Tann parturin av fiskivinnuni, sum fiskar undir Føroyum hevur enn stórar avbjóðingar. Fiskiskapurin er framvegis sera vánaligur. Veiðan eftir toski og hýsu umframt upsa, sum annars hevur verið álitið seinastu nógvu árini, er framvegis vánalig. Minni er fiskað bæði av toski og hýsu, meðan upsafiskiskapurin er heldur frægari. Verður hugt eftir samlaðu lønargjaldingunum í fiskivinnuni, sæst hetta tó ikki aftur, orsakað av økta fiskiskapinum eftir uppisjóvarfiski.

Marknaðarprísurin á útflutningsmarknaðunum hevur tó hildið sær væl, og tískil er útflutningsvirðið á botnfiski 40 mió. kr. hægri í 2014 enn í 2013.

Sjálvt um veiðutrýstið á botnfisk undir Føroyum er minkað nógv seinastu árini er tað framvegis ov høgt, sambært Havstovuni. Botnfiskastovnarnar eru sera illa fyri og hava alla vernd fyri neyðini. Føroya Arbeiðsgevarafelag vil tí enn einaferð vísa á, at tað er sera týdningarmikið, at fiskiskapurin er lívfrøðiliga burðardyggur, fyri at skapa grundarlag undir eini lønandi botnfiskavinnu undir Føroyum. Tískil eigur veiðutrýsti at tillagast sambært ráðgevingini frá Havstovuni.

Alivinnan hevur havt góðar umstøður á marknaðinum seinastu árini. Útlitini fyri 2014 vóru góð, og samlaða tøkan var 70.000 tons í kruvdari vekt í mun til 62.000 tons í 2013. Um hugt verður eftir útflutningsvirðinum frá alivinnuni, sæst at alivinnunar partur av útflutninginum nú er út við 50% av samlaða føroyska útflutninginum. 2014 gjørdist tí enn eitt metgott ár hjá alivinnuni.

Sum heild gongur tað eisini væl lívfrøðiliga í alivinni. Tó er størsta og helst einasta stóra lívfrøðiliga avbjóðingin laksalús. Alivinnan samstarvar um at tálma og loysa hesa stóru avbjóðing, og serliga áhugavert er, at tað vísir seg, at royndirnar við at brúka rognkelsi til avlúsing hava verið góðar.

Sjálvt um lønargjaldingarnar í byggivinnan ikki ery komnar uppá sama støðið, sum í 2008 eru greið tekin um, at nú gongur rætta vegin. Lønargjaldingarnar í 2014 í mun til 2013 eru vaksnar við umleið 50 mió. kr., og nú vænta góðar 50 mió. kr. í, til lønargjaldingarnar eru á sama støði, sum tær vóru í 2008. Byggivinnuni tørvar tó framvegis arbeiðsmegi, og Føroya Arbeiðsgevarafelag óttast fyri at lønarglíðing fer fram orsakað av hesum.

Samanumtikið fyri aðrar framleiðsluvinnur og tænastuvinnurnar hevur 2014 víst seg at vera heldur frægari enn undanfarnu árini.

## Føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur tørv á fólki, marknaðaratgongd fyri fiskavørur og føroyingar verða skattaðir av landinum

Ein týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at hava vakið eyga við tí, sum hendir á yvirskipaða vinnupolitiska økinum og í samfelagnum annars.

Í Føroyum búgva sløk 50.000 fólk, sum vilja hava eitt livistøði, sum er kappingarført í mun til londini kring okkum. Vit hava tó nakrar stórar avbjóðingar, sum loysn má fáast á.

Nýskipan er neyðug á fleiri økjum. Henda nýskipan skal hava til endamáls at fáa tamarhald á almennu útreiðslunum, soleiðis at betri samsvar er ímillum tað, sum kemur inn í inntøkum frá skatti og avgjøldum og útreiðslurnar hjá almenna kassanum.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum frá Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur felagið m.a. tikið spurningarnar um tilfeingis- og loyvisgjøld á fiski- og alivinnu, møguleikarnar í byggivinnuni, fólkavøkstur og tilflyting umframt burðardygga fiskiveiðu og lønsemi í fiskivinnuni til viðgerðar.

Í hesi ársfrágreiðingini hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag valt at seta ljósið á hesi trý mál: føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur tørv á fólki, at føroyingar verða skattaðir av landinum og marknaðaratgongd fyri fiskavørur.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til:

- At skattaskipanin javnsetir føroyingar í Føroyum og føroyingar, sum starvast uttanlands, at skipanin fyri ES-borgarar verður í gildi uttan mun til arbeiðsloysi, at vit fáa eina lagaliga skipan fyri serfrøðingar úr øllum heiminum, at hugsað verður føroyskt, tá arbeiði verða boðin út
- At Landsstýri setir í verk eina skipaða gjøgnumgongd av skattaskipanini, soleiðis at vit fáa loyst upp fyri teimum stórum avbjóðingunum, sum eru við høga inntøkuskattinum, og at tað í einum og øllum verður tryggjað, at føroyskir arbeiðsgevarar ikki standa verri í kappingini um arbeiðsmegina orsakað av skatti. Partur av hesum má eisini verða at kanna, hvussu hetta skal fíggjast
- At arbeiðsorka verður sett av á Løgmans-skrivstovuni og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til eitt áhaldandi arbeiði at tryggja Føroyum marknaðaratgongd til teir mest áhugaverdu marknaðirnar, og at hetta arbeiði verður skipað, soleiðis at vitan og førleiki verður uppbygdur í ráðum og stovnum. T.d. kann ein útflutningsdeild verða skipað á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum áhaldandi arbeiðir við heilsufrøðiligum avtalum og marknaðaratgongd
- At stovnar og ráð samstarva, tá samráðst verður um marknaðaratgongd. Tað nyttar ikki at hava ein fríhandilssáttmála, um vøran ikki sleppur inn í landið vegna vantandi heilsufrøðiligar avtalur

Harafturat verður mælt til, at myndugleikarnir í samstarvi við Føroya Arbeiðsgevarafelag raðfesta teir marknaðir, sum serliga skal arbeiðast við, og fyrst og fremst rætta arbeiðið móti hesum marknaðunum.

## Sáttmálasamráðingar

Sáttmálasamráðingar við fakfeløgini er týdningarmiklasta uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag. Samráðingarrundan 2014 – 2016 er nú komin væl áleiðis. Av teimum 40 sáttmálunum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur við 19 fakfeløg, eru nú allir komnir uppá pláss uttan sáttmálin við Føroysk Miðlafólk, sum gongur út 1. november í ár, og sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya, sum gongur út 1. mars 2016.

Við øll fakfeløgini er eisini gjørd avtala um fráboðanarfreist í sambandi við arbeiðssteðg. Sostatt er nú yvirskipað í gildi fráboðanarfreist á privata arbeiðsmarknaðinum. Hetta merkir, at arbeiðssteðgir skulu fráboðast við í minsta lagi 48 tímum.

Yvirskipaði útreiðslukarmurin til allar samráðingarnar hevur verið 1,98 % fyrra árið og 2,25 % seinna árið.

**22. juni 2015**

**Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**Bergur Poulsen, formaður**

# INNIHALDSYVIRLIT

**INNGANGUR** .......... 7

**HVAT ER NÚ AT GERA? TILMÆLI FRÁ FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** .......... 8

FØROYSKI ARBEIÐSMARKNAÐURIN HEVUR TØRV Á FÓLKI .......... 8
*Føroyski arbeiðsmarknaðurin má verða javnsettur* .......... 8
*Lættari atgongd til arbeiðsmegi* .......... 8
*Varðveita og økja um arbeiðsmegina* .......... 8
*Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag* .......... 9
MARKNAÐARATGONGD MÁ RAÐFESTAST .......... 9
*Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag* .......... 10
FØROYINGAR VERÐA SKATTAÐIR AV LANDINUM .......... 10
*Skattur í sambandi við arbeiði í Noreg - galdandi reglur í 2013* .......... 10
*Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag* .......... 11

**MÁL Í 2014 OG 2015** .......... 13

**SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR 2014 – 2015** .......... 14

*Samráðingarrundan 2014 - 2016* .......... 14
*Samráðingar við handverkarafeløgini* .......... 14
*Samráðingar við Súluna* .......... 14
*Samráðingar við Starvsmannafelagið* .......... 14
*Samráðingar við Finansforbundet* .......... 14
*Samráðingar við YTF* .......... 15
*Samráðingar við S & K* .......... 15
*Samráðingar við Grafiska Yrkisfelagið* .......... 15
*Samráðingar við manningarfeløgini* .......... 15
*Komandi sáttmálasamráðingar* .......... 15

**TILTØK 2014-2015** .......... 16

*Vinnunám* .......... 16
*Vinnudagurin 2014* .......... 16

**GONGDIN INNAN YMISKU VINNUGREINARNAR** .......... 18

FISKI- OG FLAKAVINNAN .......... 18
*Útflutningurin* .......... 18
*Rávørutilgongdin* .......... 18
*Flakavinnan* .......... 19
*Útlitini fyri fiskiskapin komandi fiskiár* .......... 19
*Marknaðurin* .......... 20
*Uppisjóvarvinnan* .......... 20
HAVBÚNAÐUR .......... 21
*Framleiðsla* .......... 21
*Lívfrøðiligir váðar* .......... 21
*Skattur og avgjøld* .......... 22
*Søla og marknaðarútlit* .......... 22
HANDVERKSVINNAN .......... 23
*Gongdin í byggivinnuni* .......... 23
*Innflutningurin av byggitilfari* .......... 23
*Talið á nýbyggingum* .......... 23
*Útlit fyri handverksvinnuna* .......... 24
SHIPPINGVINNAN .......... 25
OLJUVINNAN .......... 26
KT-VINNAN .......... 26
SAMSKIFTISVINNAN .......... 27
RÁÐGEVARAVINNAN .......... 27
HANDILSVINNAN .......... 28
*Ódrúgvar vørur* .......... 28
*Drúgvar og hálvdrúgvar vørur* .......... 28
*Søla av bilum* .......... 29
FERÐAVINNAN .......... 29
ÍDNAÐARVINNAN .......... 30

**UM FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG, VINNUHÚSIÐ OG FELØGINI ANNARS** .......... 32

**HVØR HÚSAST Í VINNUHÚSINUM?** .......... 33

**NEVNDIN Í FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** .......... 34

# Inngangur

Føroya Arbeiðsgevarafelag umboðar flestu arbeiðsgevarar í landinum, og er virksemið hjá okkara limum sum heild grundarlagið undir samfelagnum.

Sum ein týdningarmikil spælari í føroyska samfelagnum átekur Føroya Arbeiðsgevarafelag sær leiklutin sum viðmerkjari og viðspælari í mun til, hvussu samfelagið Føroyar eigur at vera skipað.

Sjónarmið Føroya Arbeiðsgevarafelags verða á hvørjum ári staðfest í ársfrágreiðingini og annars so hvørt á heimasíðu felagsins www.industry.fo.

Í ársfrágreiðingunum undanfarin ár og í frágreiðingum frá felagnum annars eru eisini sjónarmið felagsins um allar tættir, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur hava týdning fyri føroysku vinnuna og samfelagið.

Hetta ger Føroya Arbeiðsgevarafelag ásannandi, at góðir karmar fyri vinnu og eitt burðardygt vinnulív eru nær tengd at gongdini í samfelagnum.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum frá Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur felagið m.a. tikið spurningarnar um tilfeingis- og loyvisgjøld á fiski- og alivinnu, møguleikarnar í byggivinnuni, fólkavøkstur og tilflyting umframt burðardygga fiskiveiðu og lønsemi í fiskivinnuni til viðgerðar.

Í hesi ársfrágreiðingini fyri 2014 nýtir Føroya Arbeiðsgevarafelag høvi at koma við sínum sjónarmiðum um, hvørji viðurskifti tørvur eisini er á at vísa ans komandi tíðina. Hetta verður gjørt fyri at skapa kjak um loysnir fyri føroyska samfelagið, soleiðis at vit fáa eitt gott og sterkt grundarlag undir tí búskaparvøkstri sum vit nú hava.

Tað eru óivað onnur viðurskifti, sum høvdu verið týdningarmikil at tikið upp, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í ár valt at seta sjóneykuna á hesi:

- Atgongd til arbeiðsmegi
- At føroyingar verða skattaðir av landinum
- Marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur

# Hvat er nú at gera? Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

## *Føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur tørv á fólki*

Føroyski arbeiðsmarknaður er opin, og føroyingar yvirhøvur flyta seg lættliga eftur nýggjum størvum. Hetta hevur higartil merkt, at tá tað ikki eru nokk av størvum at fáa í Føroyum, flyta føroyingar aðrastaðni eftir størvunum. Hetta hevur verið bæði sunt og gott fyri føroyska búskapin.

Tað sær tó út til at vera komin ein broyting í. Føroyingar eru enn sinnaðir at flyta eftir størvunum, men nú verður tað eisini gjørt, tá somu størv eru tøk á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Tað er vorðið so mikið lætt og so mikið tiltrekkjandi at hava starv uttanlands, at partur av føroysku arbeiðsmegini velur Føroyar frá, tí lønarskatturin í Føroyum er 10-14 % hægri enn í t.d. Noregi, alt eftir inntøku.

Hetta skal tó ikki skiljast soleiðis, at tað eiga at verða settar forðingar fyri, at føroyingar sleppa at flyta seg eftir størvinum. Trupulleikin er, at tað loysir seg betri at arbeiða uttanlands enn í Føroyum, og at tað ikki ber til hjá føroyskum fyritøkum at fáa onnur starvsfólk inn í staðin.

Tað er ongin loyna, at føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur ein av heimsins mest attraktivu arbeiðsmarknaðum sum sín næsta granna. Afturat hesum kemur, at flestu norðanlond hava tørv á arbeiðsmegi, og megna vit ikki at fylgja við í tí kappingini, missa vit bæði okkara egnu og útlendsku arbeiðsmegina, sjálvt um føroyska vinnan er kappingarfør um lønina.

### Føroyski arbeiðsmarknaðurin má verða javnsettur

Við omanfyri nevndu avbjóðingum hjá Føroyum og føroyskari vinnu er tað alneyðugt, at politiska skipanin viðurkennir hesar trupulleikar og handlar hareftir.

Vit skulu ikki verja okkara arbeiðsmarknað óneyðugt, men vit mugu heldur ikki gera tað øvugta. Tíverri sær tað fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag út til, at hetta er støðan.

Okkara skattaskipan er soleiðis sett saman, at tað loysir seg betri hjá einum føroyingi at arbeiða uttanlands enn hjá einum føroyingi at arbeiða í Føroyum. Og hetta er ikki orsakað av lønini. Var sama løn goldin í Føroyum og uttanlands, hevði føroyingurin framvegis havt væl meira eftir, um hann arbeiddi uttanlands. Hetta líkist ongum. At lønirnar í onkrum førum eru betri uttanlands, má vera sum tað er. Men skattaskipanin má ikki eggja føroyingum at fara av landinum.

### Lættari atgongd til arbeiðsmegi

Føroyar hava ein opnan arbeiðsmarknað - úteftir. Tíverri er ikki tað sama galdandi inn í landi. Norðurlendingar sleppa frítt at arbeiða í Føroyum, men av tí at hini norðurlondini sum nevnt hava líknandi tørv á útbúnum fólki, so loysir hetta lítið fyri okkum. Tí er alneyðugt, at vit, áðrenn skaðin hendur, lata upp fyri øðrum útlendingum at sleppa at arbeiða í Føroyum.

Lógarbroyting varð gjørd í útlendingalógini í fjør, soleiðis at tá arbeiðsloysið er undir 6 %, kunnu fyritøkur í byggivinnuni við undangóðkenning lættari seta ES-borgarar, sum hava eina handverkaraútbúgving, í starv. Eisini er nú ásett, at tá arbeiðsloysið fer undir 3,5 %, er hetta galdandi fyri allan arbeiðsmarknaðin. Nú arbeiðsloysið nærkast 3 %, merkir hetta, at fyritøkur, sum eru undangóðkendar, lættari kunnu seta útlendingar úr ES í starv. Avgjørt ein støða, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um. Um vit ikki fáa røttu fólkini til røttu størvini, hevur hetta við sær eina lønarglíðing, og kappingarførið hjá føroysku fyritøkunum versnar. Hetta hevur í síðsta enda við sær, at føroysk vinna verður forða í at sleppa at menna seg.

Tað er tó framhaldandi málið og ynski hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, at bæði 6 % reglan og 3,5 % reglan verður tikin burtur, soleiðis at lagaliga mannagongdin altíð er galdandi. Uttan mun til arbeiðsloysi. Tað er týdningarmikið, at hurðin inn á føroyska arbeiðsmarknaðin er líka opin inneftir sum úteftir. Afturat hesum eiga vit at hava eina skipan, soleiðis at høgt útbúgvin fólk og serfrøðingar úr øllum heiminum hava lætta atgongd til føroyska arbeiðsmarknaðin.

### Varðveita og økja um arbeiðsmegina

Vit høvdu innan yrkisútbúgvingarøkið methøga tilgongd av lærlingum mitt í farna áratíggju. Hetta skuldi so sæst aftur í fleiri sveinum nú, men so er ikki. Okkum tørvar framvegis handverkarar, tí hesir eru farnir uttanlands at arbeiða.

Við ov fáum sveinum ber heldur ikki til at seta lærlingar. Tí kann tað í longdini fáa álvarsamar avleiðingar, um vit ikki fáa sett gongd á lærlingatilgongdina. Tað er neyðugt at gera tað attraktivt hjá vinnuni at seta lærlingar, men tað

er eisini neyðugt, at sveinarnir halda tað vera spennandi at vera í Føroyum, soleiðis at grundarlagið fyri at seta lærlingarnar er til staðar.

Tá tað almenna bjóðar uppgávur út, er tað bara prísurin, sum er avgerandi fyri, hvør fær uppgávuna. Tað er sum so einki skeivt í tí, men tað almenna má eisini taka atlit til tað samfelagsgagnliga í, at tað eru fyritøkur, sum hava sítt støði í Føroyum og føroyskari arbeiðsmegi, sum fáa uppgávurnar. Hetta merkir ikki, at føroyskar fyritøkur fyri einhvønn prís skulu hava arbeiði. Tær skulu eisini kunnu veita eina dygdargóða og kappingarføra tænastu/vøru. Í útbjóðingartilfarinum eiga tó at verða settar treytir, har fyritøkur kunnu vísa, hvat hetta leggur eftir seg í Føroyum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur m.a., at eitt av krøvunum, tá tað almenna bjóðar arbeiðir út, skal vera, at tær fyritøkurnar, sum bjóða uppá arbeiðir hava eitt ávíst tal av lærlingum í mun til støddina á virkinum og soleiðis vísa, hvussu tær taka ábyrgd fyri vinnuni og samfelagnum øllum.

## Samanumtikið

Føroysk arbeiðsmegi hevur frítt at fara um landamørk, og føroyska skattaskipanin stimbrar føroyingum at arbeiða uttanlands. Samstundis er trupult at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya at arbeiða, hóast ein lagaligari mannagongd er galdandi í løtuni.

Eisini eru avbjóðingar í mun til at seta lærlingar, tí sveinarnir hava valt at arbeiða uttanlands.

## Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

- At skattaskipanin javnsetir føroyingar í Føroyum og føroyingar, sum starvast uttanlands
- At skipanin fyri ES ríkisborgarar verður í gildi uttan mun til arbeiðsloysi
- At vit fáa eina lagaliga skipan fyri serfrøðingar úr øllum heiminum
- At hugsað verður føroyskt, tá arbeiði verða boðin út

# *Marknaðaratgongd má raðfestast*

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur seinastu árini áhaldandi varpað ljós á vantandi marknaðaratgongdina fyri føroyskan útflutning, serliga fyri føroyskar fiskavørur. Serliga umráðandi er, at marknaðaratgongdin hjá føroyskum útflytarum ikki er verri enn hjá fremstu kappingarneytunum. Dreymastøðan hjá føroyskum útflutningsfyritøkum hevði sjálvandi verið, at vit høvdu betri marknaðaratgongd enn okkara kappingarneytar, men støðan í dag er tann øvugta. Á fleiri áhugaverdum marknaðum er marknaðaratgongdin verri enn hjá kappingarneytunum, og tað merkir færri arbeiðspláss, færri íløgur og minni lønsemi í Føroyum.

Eitt feskt og sjónligt dømi um hetta eru ætlanirnar um at byggja eitt niðursjóðingarvirki í Føroyum. Ein slík ætlan verður nógv truplari av tí, at tollur er á niðursjóðaðum fiskavørum inn til ES. ES er ein týðandi marknaður fyri niðursjóðaðar vørur, og ein tollur á 25% á niðursjóðaðum fiskavørum ger tað ómøguligt at kappast við ES-virki, sum ikki skulu rinda henda tollin. Hetta merkir, at um eitt slíkt virki skal byggjast, verður neyðugt at dúva uppá marknaðir uttanfyri ES til at selja vørurnar. Og tað verður uttan iva ein stór avbjóðing.

Hóast hetta er eitt ógvuliga sjónligt dømi um týdningin av marknaðaratgongd, er hetta gerandiskostur hjá føroyskum fiskaútflytarum. Fyrispurningar frá áhugaðum keyparum úti í heimi mugu svarast við einum “Tíverri!” Antin tí vit ikki hava neyðugu heilsufrøðiligu avtalurnar, ella tí tollurin vegna vantandi fríhandilsavtalur er hægri enn hjá kappingarneytunum.

Uppgávan er ikki løtt hjá føroysku myndugleikunum. Orsakað av avmarkaðu støddini á føroyska marknaðinum, enda Føroyar ofta niðarliga á raðfestingarlistanum hjá teimum londum, sum vit eru áhugaði í at gera fríhandilsavtalur við. Tí er tað alneyðugt, at almennu Føroyar veruliga raðfesta hesa uppgávu, sum krevur eitt áhaldandi arbeiði frá føroyskum stovnum og ráðum. Tíverri mugu vit staðfesta, at neyðuga orkan ikki verður sett av til hetta arbeiðið. Hetta er partvíst ein spurningur um játtan, men eisini partvíst ein spurningur um, hvussu stovnar og ráð raðfesta hesa uppgávu og skipa arbeiðið. Tað er ikki nóg gott, at skriv frá

útlendskum myndugleikum liggja ósvarað í langa tíð, tí orka ikki verður sett av til at arbeiða við marknaðaratgongd.

At tað ber til at fáa slíkar avtalur í lag, er nýggja fríhandsavtalan við Turkaland eitt feskt dømi um. Tað skuldi eitast ikki at bera til at fáa eina líka góða avtalu við Turkaland, sum EFTA londini høvdu frammanundan, men tá av tornaði, stóð tann føroyska avtalan einki aftanfyri, og tað er m.a. føroysku samráðingarfólkunum fyri at takka. Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast sjálvsagt um nýggju fríhandilsavtaluna við ein stóran marknað, men vónar samstundis, at tað ikki skulu ganga 10 ár, til næsta avtalan verður gjørd. Ferðin má setast upp, skulu vit ikki gerast enn størri eftirbátur á hesum økinum enn vit eru frammanundan.

Tíðin arbeiðir ikki fyri okkum. Canada og ES eru komin á mál í samráðingunum um sínamillum fríhandilsavtalu, sum gevur tollfrælsi til 99% av vørunum, herundir fiskavørum. Samráðingarnar millum ES og Japan um nýggja fríhandilsavtalu eru væl ávegis, og ES og USA samráðast eisini um fríhandilsavtalu.

Í kanning, sum Føroyar Arbeiðsgevarafelag gjørdi millum sínar limir í 2014, var eisini áhugi fyri at fáa betri marknaðaratgongd til Brasil, Turkaland, Kina og Avstralia. Harumframt er eisini ynski um at fáa betrað um fríhandilsavtaluna við ES. Viðurskiftini kunnu tó skjótt broytast, og um okkara kappingarneytar fáa fríhandilsavtalur við áhugaverdar marknaðir er alneyðugt, at vit fáa líka góðar treytir.

## Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

- At arbeiðsorka eigur at verða sett av á Løgmansskrivstovuni og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til eitt áhaldandi arbeiði at tryggja Føroyum marknaðaratgongd til teir mest áhugaverdu marknaðirnar
- At hetta arbeiðið eigur at verða skipað, so at vitan og førleiki verður uppbygdur í ráðum og stovnum. T.d. kundi ein útflutningsdeild, sum áhaldandi arbeiðir við heilsufrøðiligum avtalum og marknaðaratgongd, verið skipað á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni
- At tað hevur týdning at stovnar og ráð samstarva, tá samráðst verður um marknaðaratgongd. Tað nyttar ikki at hava ein fríhandilssáttmála, um vøran ikki sleppur inn í landið vegna vantandi heilsufrøðiligar avtalur
- At myndugleikarnir mugu í samstarvi við Føroya Arbeiðsgevarafelag raðfesta teir marknaðir, sum serliga skal arbeiðast við og fyrst og fremst rætta arbeiðið móti hesum marknaðunum.

# *Føroyingar verða skattaðir av landinum*

Grundarlagið undir at hava eitt kappingarført føroyskt vinnulív liggur fyri stóran part í at hava atgongd til røttu arbeiðsmegina. Kappingarførið um arbeiðsmegina er treytað av fleiri viðurskiftum, og eitt av teimum týdningarmestu er, hvat tann einstaki hevur eftir í lønarposanum, tá skatturin er goldin. Hetta bæði tá tað snýr seg um valið ímillum frítíð ella arbeiði, og um valið millum at arbeiða í Føroyum ella uttanlands.

Í Føroyum hava vit ein av heimsin hægstu lønarskattum, og hetta hevur fleiri óhepnar avleiðingar. Fyri kappingarførið hjá fyritøkunum og virksemið í Føroyum er ein av mest óhepnu avleiðingunum, at stórur partur av starvsfólkunum velja sær arbeiði í londum, har lønarskatturin er lægri enn í Føroyum, serliga í Noregi.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað er bráneyðugt, at vit fáa lønarskattin niður á eitt støði, har vit javnstilla føroyingar, sum arbeiða í Føroyum við føroyingar, sum arbeiða uttanlands.

## Skattur í sambandi við arbeiði í Noreg – galdandi reglur í 2013

Av tí, at serliga Noregi tykist at draga nógva føroyska arbeiðsmegi, er niðanfyri greitt nærri frá skattaviðurskiftum hjá persónum, sum arbeiða á landi í Noreg.

Tá ið føroyingar arbeiða í Noregi, gjalda teir skatt í Noregi eftir norskum reglum. Norska skattaskipanin líkist tí føroysku við tað, at skattur verður goldin bæði til land og kommunu, umframt at eitt serligt sosialt gjald á 7,8% verður goldið til

"Folketrygd", sum gevur rætt til ávísar tænastur. Hóast skattaskipanin líkist tí føroysku, gjalda føroyingar sum oftast væl minni í skatti av inntøkum Noregi, enn, hvat teir høvdu goldið í skatti í Føroyum av tilsvarandi inntøku.

Í niðanfyristandandi dømi er víst hvussu nógv, ið verður goldið í skatti og sosialum gjøldum av mánaðarlønum frá 25.000 kr. til 33.333 kr. í ávikavist Norra og Føroyum. Mánaðarlønir frá 25.000 kr. 33.333 kr. eru nýttar í døminum.

Av tí at munurin millum tann lægra norska skattin og tann hægra føroyska skattin ikki skal gjaldast afturat í Føroyum, hevur føroyingur, sum arbeiðir í Noregi, millum 3.910 kr. og 4.761 kr. meira eftir um mánaðin, enn um hann arbeiddi í Føroyum, og forvann somu inntøku.

| Arbeiði í Norra | | | |
|---|---|---|---|
| Mánaðarløn | 25.000 | 29.167 | 33.333 |
| Skattur + sosial gjøld | 5.844 | 7.288 | 8.732 |
| Netto eftir | 19.156 | 21.878 | 24.601 |

| Arbeiði í Føroyum | | | |
|---|---|---|---|
| Mánaðarløn | 25.000 | 29.167 | 33.333 |
| Skattur + sosial gjøld | 9.754 | 11.622 | 13.494 |
| Netto eftir | 15.246 | 17.544 | 19.839 |
| **Munur** | **3.910** | **4.334** | **4.761** |

Í omanfyristandandi dømum er gjald uppá 7,8% til "Folketrygd" íroknað. Føroyingar, sum arbeiða í Norra, hava møguleika til at frávelja at gjalda norsku Folketrygd. Hetta er tó treytað av, at goldið verður til tær føroysku tryggingarnar, herundir ALS og barsilsskipanina. Føroyingar, sum arbeiða í Norra, velja í flestu førum ikki at gjalda til Folketrygd, men til føroysku sosialu skipanirnar. Gjaldið til føroysku sosialu skipanirnar eru góð 4% lægri enn Folketrygd í Noreg, og tað merkir, at av tí, at flestu føroyingar velja Folketrygd frá, gerst skattligi fyrimunurin av at arbeiða í Noregi enn størri, enn talvan omanfyri vísir.

Omanfyrinevndu útrokningar eru grundaðar á miðalprosent og taka ikki hædd fyri, at persónar alt eftir umstøðunum kunnu verða skattaðir ymiskt bæði í Norra og í Føroyum. Útrokning av norska skattinum er gjørd sambært rokniskipan á heimasíðuni hjá norsku skattamyndugleikunum, www.skattetaten.no.

## Samanumtikið

Um hugt verður eftir, hvussu føroyingar, sum arbeiða í Føroyum, verða skattaðir, sæst, at tað eisini er munur á, hvussu føroyskir løntakarar, sum arbeiða í Føroyum, verða skattaðir alt eftir hvørjari vinnu hesi arbeiða í, t.d. í fiskiveiðu ella á landi. Hetta er eisini ein avlaging av arbeiðsmegini millum vinnugreinar, sum eigur at verða ruddað burtur.

Tað skerst tó ikki burtur, at kappingin við Noreg um føroysku arbeiðsmegina er ein sera stór avbjóðing. Tískil er bráneyðugt, at farið verður undir eina fyrireiking av at broyta skattaskipanina soleiðis, at arbeiðsmegin, sum býr og arbeiðir í Føroyum, verður javnsett við arbeiðsmegina, sum eisini býr í Føroyum, men sum arbeiðir og rindar skatt uttanlands.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur sett ein arbeiðsbólk at koma við uppskoti um, hvussu føroyska skattaskipanin eigur at verða tillagað. Arbeiðið er komið væl áleiðis, og felagið roknar við, at frágreiðing verður løgd fram í næstum.

## Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroyingar verða skattaðir av landinum. Skattligu treytirnar serliga í Noregi gera, at tað er sera áhugavert hjá arbeiðsmegini at flyta seg hagar at arbeiða. Hetta hevur avleiðingar fyri alla føroysku vinnuna, sum hevur trupult við at fáa fólk við tøkniligum og handaligum førleikum í starv. Føroyskt vinnulív kappast fegið um løn, men skattin fær vinnulívið ikki gjørt nakað við. Tað hevur alstóran týdning, at føroyska samfelagið er kappingarført um arbeiðsmegina, og er skattur ein sera týdningarmikil partur av hesum.

- At skattaskipanin verður endurskoðað beinanvegin við tí endamáli at lækka lønarskattin. Partur av hesum má eisini verða at kanna, hvussu hetta skal fíggjast

- At tað í einum og øllum verður tryggjað, at føroyskir arbeiðsgevarar ikki standa verri í kappingini um arbeiðsmegina orsakað av skatti

# Mál í 2014 og 2015

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verða nevnd yvirskipað mál frá farna ári, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið partur av, og sum eru umráðandi fyri vinnuna.

Umframt tey mál, sum eru nevnd niðanfyri, ger Føroya Arbeiðsgevarafelag og hini feløgini í Vinnuhúsum eina rúgvu av hoyringssvarum í sambandi við nýggja lóggávu og reglur. Til ber at lesa øll hesi hoyringssvar á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo undir kassanum til høgru, sum eitur "Hoyringar".

Eisini verður javnan skipað fyri kunningartiltøkum um evnir, sum eru viðkomandi fyri limir okkara.

- 2014 var árið tá nýtt Vinnuhús varð tikið í brúk. Avhendingin varð framd 19. september, og hin 7. november varð almenn móttøka. Við nýggja bygninginum fáa Føroya Arbeiðsgevarafelag og hini feløgini í húsinum ógvuliga góðar karmar at virka undir. Umframt skrivstovur til starvsfólkini og væl egnaði høli til nógvar fundarvirksemi eru eisini góðar umstøður hjá limum og øðrum at støkka inn á gólvið og arbeiða eina løtu, t.d. meðan bíðað verður millum tveir fundir. Vónandi fara limir at nýta henda møguleika dúgliga. Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag.

- Í november 2014 hevði Føroya Arbeiðsgevarafelag kunningartiltøk fyri limum kring landið. Tiltøkini vórðu hildin í Vági, í Klaksvík, í Sørvági, í Runavík og í Tórshavn. Kunnað varð um virksemi hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag og Vinnu-húsinum yvirskipað, um setanarviðurskifti og um byggijura. Eisini vitjaðu starvsfólkini fyritøkur í teimum økjunum, kunningartiltøkini vórðu hildin.

- Nýggjar reglur í sambandi við at seta útlendska arbeiðsmegi í starv komu í gildi 1. juli 2014. Skipanin er nú soleiðis, at fyritøkur kunnu verða undangóðkendar til at seta arbeiðsmegi úr ES-londum í starv uttan at søkjast skal um arbeiðs- og uppihaldsloyvi fyrst. Skipanin er galdandi, tá arbeiðsloysið í Føroyum er lægri 3,5 %. Tó kunnu byggifyritøkur nýta smidligu skipanina, tá arbeiðsloysið er undir 6 %. Tá skipanin kom í gildi 1. juli var arbeiðsloysið lægri enn 6 %, so hon var alt fyri eitt galdandi fyri byggivinnuna. Í december 2014 kom arbeiðsloysið undir 3,5 %, og er skipanin sostatt nú galdandi fyri allan arbeiðsmarknaðin.

- Arbeiðsbólkur undir Fíggjarmálaráðnum hevur í ár gjørt eina frágreiðing um Landsverk. Umboð fyri Føroya Handverksmeistarafelag/Ráðgevarafelagið luttók í hesum arbeiði. Frágreiðing var latin landsstýrismanninum í Fíggjarmálum herfyri. Tilmælini frá vinnuni vóru greið. Landsverk skal útveita allar rakstraruppgávur, so sum kavarudding, asfaltering, viðlíkahald, prosjektering v.m.

- Løgmansskrivstovan er í ár farin undir at eftirmeta Hoyvíkssáttmálan. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið við í innleiðandi arbeiðnum til hetta, og hevur eisini verið við at vísa á, hvørji evni upptaka vinnuna og eru verd at kanna nærri. At samstarva við almennar myndugleikar á henda hátt er eitt av endamálum okkara, og tí fegnast vit um vera tikin við uppá ráð, tá slíkt arbeiði sum hetta verður gjørt.

- Mentamálaráðið setti í 2014 ein arbeiðsbólk at gera tilmæli um bygnaðin á nýggja Marknagilsdeplinum. Semja fekst ikki í bólkinum um eitt felags tilmæli. Partur av arbeiðsbólkinum mælti til, at Marknagilsdepilin skuldi skipast sum ein vanligur landsstovnur, har stjórin vísti til Mentamálaráðið, men við einum ráðgevandi ráði. Hin parturin mælti til, at eitt veruligt stýri varð sett fyri Marknagilsdepilin, eins og á Fróðskaparsetri Føroya. Mælt varð til at stýrið varð mannað við fólki við fakligum førleikum, og sum m.a. høvdu kunnleika til vinnulívið. Orsøkin til hetta tilmæli var ein roynd at tryggja, at yrkisútbúgvingarnar eisini fáa tað fokus, sum er neyðugt, og at neyðugur dialogur er millum skúla og vinnulív um hesar útbúgvingar.

Í vár var so avgjørt, at Marknagilsdepilin skuldi skipast sum vanligur landsstovnur, tó við einum depilsráði, sum ætlandi skal ráðgeva um yrkisfakligu útbúgvingarnar.

## Sáttmálasamráðingar 2014 – 2015

Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum tess varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum á landi umframt Reiðarafelagið fyri Farmaskip.

Størsta sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag. Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu, og leggja tær støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

### Samráðingarrundan 2014 – 2016

Samráðingarrundarn 2014 – 2016 er nú komin væl áleiðis. Av teimum 40 sáttmálunum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur við 19 fakfeløg, eru nú allir komnir uppá pláss uttan sáttmálin við Føroysk Miðlafólk, sum gongur út 1. november í ár, og sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya, sum gongur út 1. mars 2016. Við øll fakfeløgini er eisini gjørd avtala um fráboðanarfreist í sambandi við arbeiðssteðg. Sostatt er fráboðanarfreist nú yvirskipað í gildi á privata arbeiðsmarknaðinum. Hetta merkir, at arbeiðssteðgir skulu fráboðast við í minsta lagi 48 tímum.

Yvirskipaði útreiðslukarmurin til allar samráðingarnar hevur verið 1,98 % fyrra árið og 2,25 % seinna árið.

Niðanfyri er ein gjøgnumgongd av teimum sáttmálasamráðingum, sum hava verið síðan ársfrágreiðingina í fjør.

### Samráðingar við handverkarafeløgini

Við hjálp frá semingsmanninum vórðu Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag øðrumegin og Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna samd um nýggjan sáttmála hin 28. oktober 2014.

Semja var um eina lønarhækking á 1,98 % fyrra árið og 2,25 % seinna árið, og sostatt er talan um sama útreiðslukarm sum fyri hini feløgini, semja er gjørd við.

Undir samráðingunum ynsktu handverkarafeløgini at samráðast um karmin saman við arbeiðarafeløgunum. Hetta góðtóku Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag undir ávísum treytum. Serliga legði arbeiðsgevarasíðan dent á, at samráðingarsamstarvið millum arbeiðara- og handverkarafeløgini varð greitt formaliserað, og at samráðingarleisturin skuldi avtalast skrivliga millum fakfelags- og arbeiðsgevarasiðuna.

Arbeiðarafeløgini og handverkarafeløgini skulu boða Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag frá, hvørt tey eru samd um ein nýggjan samráðingarleist, fyri 1. januar 2016.

### Samráðingar við Súluna

Hin 15. december 2014 varð sáttmáli undirskrivaður við Súluna, sum er fakfelagið hjá flogternum við Atlantic Airways.

Talan er um tvey-ára sáttmála, sum gongur frá 1. november 2014 til 1. november 2016.

Ávísar broytingar og tillagingar vórðu gjørdar í sáttmálanum, m.a. í mun til arbeiðstíð, men annars var eisini hesin sáttmálin á eini lønarhækking, sum var 1,98 % fyrra árið og 2,25 % seinna árið.

### Samráðingar við Starvsmannafelagið

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tveir sáttmálar við Starvsmannafelagið. Annar er fyri starvsfólk á Føroya Tele og hin fyri starvsfólk á Posta. Samráðingar vóru um báðar sáttmálarnar samstundis, og endaðu hesar við semju 16. januar í ár. Semja var á sama støði, sum hinir sáttmálarnir Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt, 1,98 % fyrra árið og 2,25 % seinna árið. Sáttmálarnir ganga frá 1. januar 2015 til 1. januar 2017.

### Samráðingar við Finansforbundet

Sáttmálin við Finansforbundet er galdandi fyri starvsfólk í BankNordik, Trygd og Skyn. Semja millum partarnar varð undirskrivað hin 25. mars í ár. Talan er um nýggjan tvey-ára sáttmála, sum gongur frá 1. mai 2015 til 1. mai 2017. Partarnir vóru samdir um ein karm á 1,98 % fyrra árið, av hesum vórðu 0,13 % brúkt til annað enn løn, sum

soleiðis hækkaði við 1,85 %. Annað árið varð avtalað ein lønarhækking á 2,25 %.

## Samráðingar við YTF

Fyri restina av føroyska fíggjar- og tryggingarheiminum er sáttmáli millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og YTF galdandi. YFT er yrkisfelag teirra, ið starvast í tryggingar-, fíggjar-, KT o.l. fyritøkum.

Semja varð um við fakfelagið um nýggjan tvey-ára sáttmála hin 26. mars í ár. Sáttmálin er galdandi frá 1. mai 2015 til 1. mai 2017.

Hækkingin í lønini var ásett til 1,97 % fyrra árið og 2,25 % seinna árið. Tað vil siga, at 0,01 % varð brúkt til annað enn løn fyrra árið.

Somu feløg hava eisini ein sáttmála, sum er galdandi fyri starvsfólkini á Elektron. Feløgini vórðu hesuferð samd um ikki at gera broytingar í sáttmálanum nú, men at leingja verandi sáttmála óbroyttan í eitt ár. Sáttmálin er sostatt í gildi inntil 1. juni 2016.

## Samráðingar við S & K

Føroya Arbeiðsgevarafelag og S&K skrivaðu undir nýggjan tvey ára sáttmála hin 21. apríl.

Partarnir vóru eisini her samdir um eina lønarhækking á 1,98 % fyrra árið og 2,25 % seinna árið, og at øll hækkingin varð løgd á lønina.

Sáttmálin er galdandi frá 1. mai 2015 til 1. mai 2017.

## Samráðingar við Grafiska Yrkisfelagið

Føroya Prentsmiðjufelag saman við Føroya Arbeiðsgevarafelag skrivaði 6. mai undir semju um nýggjan tvey ára sáttmála við Grafiska Yrkisfelagið saman við Landsfelag Handverkaranna.

Sáttmálin er galdandi fra 1. mai 2015 til 1. mai 2017. Semjan hevur við sær, at fyrra árið verður brúkt av útreiðslukarminum soleiðis, at lærlingar nú fáa sama eftirlønarprosent sum útlærd. Tað merkir, at lønarhækkingin annars verður 1,03 % fyrra árið og 2,25 % seinna árið.

## Samráðingar við manningarfeløgini

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur saman við Reiðarafelagnum fyri Farmaskip sáttmálar við tey trý manningarfeløgini. Hesir sáttmálar eru galdandi fyri manningar við føroyskum handilsskipum.

Seinastu árini hava tey trý manningarfeløgini samráðst saman, men tað ynsktu tey ikki hesuferð. Tí var talan um tríggjar samráðingar og tríggjar semjur. Allir sáttmálarnir eru tó galdandi frá 1. mars 2015 til 1. mars 2017, og í øllum semjunum var talan um eina lønarhækking á 1,98 % fyrra árið og 2,25 % seinna árið.

Fyrsta semjan, sum varð undirskrivað, var við Maskinmeistarafelagið hin 18. februar. Síðan varð undirskrivað við Sjómannadeild Føroya Fiskimannafelags hin 27. februar, og hin 9. mars varð so semja undirskrivað við Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

## Komandi sáttmálasamráðingar

Sum nevnt omanfyri, eru teir sáttmálar, sum eftir eru í verandi samráðingarrundur, hesir:

- Føroysk Miðlafólk
- Flogskiparafelag Føroya

Nýggj samráðingarrunda byrjar, tá sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini fara úr gildi 1. mai 2016.

| | |
|---|---|
| 1. november 2015 | Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk fyri miðlafólk í privata geiranum. |
| 1. apríl 2016 | Sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya fyri flogmenn hjá Atlantic Airways |
| **1. mai 2016** | **Sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini gongur út.**<br>**Nýggj samráðingarrunda byrjar.** |

# Tiltøk 2014-2015

## Vinnunám

Vinnunám er skeiðstænastan hjá Vinnuhúsinum. Her verður skipað fyri skeiðum og kunningardøgum til limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Endamálið við Vinnunámi er at økja um fakliga førleikan hjá fyritøkum - bæði á leiðslustøði, og eisini innan ítøkiligar partar av gerandisdegnum í eini fyritøku.

Vinnunám hevur lagt seg eftir at bjóða limunum skeið og kunningardagar, sum eru beinrakin og viðkomandi fyri vinnuna á einum ítøkiligum støði.

Hetta seinasta árið hevur verið skipað fyri einum skeiðið í Byggiløgfrøði. Undirvísari á skeiðnum var Peter Andersen, leiðandi løgfrøðingur hjá Håndværksrådet, ið fleiri ferðir áður hevur hildið skeið í Føroyum.

Í november varð skipað fyri fimm limatiltøkum um setanar- og sáttmálavirðurskifti. Tiltøkini vóru í Vági, Runavík, Sørvági, Klaksvík og Tórshavn. Starvsfólk úr Vinnuhúsinum greiddi frá um sáttmálarnar sum Føroya Arbeiðsgevarafelag varðar av, um byggijura og um virksemið sum heild hjá Vinnuhúsinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag skipaði fyri, at Vinnuhúsið hevði ein bás á tiltakinum Jobmatch 2014. Hetta er afturvendandi tiltak, sum felagið hevur verið við til at fyriskipað fyri at geva høvi til lesandi í Føroyum og uttanlands at koma í samband við føroyskt vinnulív.

## Vinnudagurin 2014

Hetta var 15. ferð, at skipað varð fyri Vinnudegnum. Tað er framvegis týdningarmikið at halda fast við henda eina dagin um árið, har føroysk vinna kann vera saman um hetta, sum onkur hevur kallað hátíðardagur vinnunar. Luttøkan var góð, og dagurin væleydnaður.

Á Vinnudegnum vóru sum vanligt Ársins Virki og Ársins Átak kosin.

**Dómsnevndin valdi Skansi Offshore til Ársins Virki 2014. Grundgevingin hjá dómsnevndini var hendan:**

*"Sum júst varð avdúkað í slóðbrotandi framførsluni hjá nøkrum av okkara nógvu dugnaligu sjónleikarum, hevur dómsnevndin valt Skansi Offshore sum Ársins Virki 2014. Og at bróta slóð man vera tað, sum best eyðkennir Ársins Virki í ár.*

*Tað krevur nevniliga nakað serligt at skula virka sum veitari til oljuvinnuna uttan at hava eina oljuframleiðslu í heimlandinum. Vanahugsan hevði sagt, at tað ber ikki til ella er ov strævið. Men lukkutíð eru tað ikki øll sum hugsa á henda hátt, men sum heldur hugsa, at oljuframleiðsla er í øðrum londum, eisini okkara næstu grannalondum, og at føroyingar tí sum ein siglandi tjóð eisini eiga at kunna brúka skip til annað enn at fiska við.*

*Tak ikki feil, eingin livur av hugskotum eina. At fáa fótin fastan sum veitari innan oljuvinnuna er hart arbeiði, og at liva upp til settu krøvini er krevjandi. Skansi Offshore hevur tó megnað at prógva fyri sínum kundum, at felagið er álitandi, at tey duga síni ting, og tað er ikki so lítið. Men felagið kann eisini vísa á, at tey eru væl fyri at liva upp til settu krøvini.*

*Skansi Offshore hevur lagt seg eftir at seta føroyingar í starv og at menna tey til tað, sum krevst til tess at liva upp til sett krøv í oljuvinnuni. Hetta hevur so eisini verið við til at ment bæði ástøðiligu og praktisku førleikarnir starvsfólkunum, m.a. hjá okkara siglandi fólki, sum frammanundan hava gott orð á sær. At hava vælútbúgvin sjófólk og fólk á landi við vitan um frálanda veitingarvinnu er eitt gott grundarlag fyri at víðarimenna hesa vinnugrein frameftir. Umframt at keypa vørur og tænastur í Føroyum, roynir felagið eisini so vítt møguligt at senda síni fólk á skeið í Føroyum, og hevur tað verið við til at styrkt skeiðs- og undirvísingarvirksemið her heima í Føroyum.*

*Skansi Offshore rekur í dag virksemi innan frálandavinnuna í Noregi og hevur eisini haft virksemi so langt burtur sum Eystur Afrika. Millum kundarnar teljast heilt stórar fyritøkur sum Statoil, BP og BG. Kundarnir eru eisini nøgdir við ta tænastuna, sum Skansi Offshore veitir. Besta prógvið um hetta er, at kundarnir koma aftur til felagið, tá verandi sáttmálar ganga út. Á botnlinjuni merkir hetta, at Skansi Offshore, hóast eina íløgu uppá meiri enn 1.5 mia. í vinnutólum, hevur megnað at fingið positivt úrslit seinastu árini, samstundis sum virksemið er vaksið.*

*Við jøvnum millumbilum stingur kjak seg upp um, hvørt Føroyar fáa nakað burturúr FAS-skipanini. Tað, sum millum annað avger um FAS-skipanin er ein succés ella ein fiasko, er ikki talið á skipum, sum velja at skráseta seg her, men heldur, hvussu nógv beinleiðis- og avleitt virksemi, tað eydnast okkum at skapa burturúr tí, at reiðarí velja at skráseta seg her. Øll skipini hjá Skansi Offshore*

*eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni FAS, og øll umsiting hjá felagnum er í Føroyum. Felagið er eitt dømi um, at FAS-skipanin kann vera við til at menna eina nýggja føroyska vinnugrein og føra til avleitt virksemi í Føroyum.*

*So fyri at taka samanum: Vit hava enn ikki funnið olju undir Føroyum, men vit hava eina føroyska oljuvinnu. Ársins Virki virkar innan oljuvinnuna, og Ársins Átak er ein oljuboripallur. So kom ikki og sig at føroysk vinna ikki dugir og torir at hugsa outside the box og skapa nýggjar vinnuvegir, bæði í Føroyum og uttanlands.*

*Vit eru tí errin og fegin um at kunna ynskja Jens Meinhard Rasmussen og Tummas Justinussen frá Skansi Offshore tillukku við heiðrinum sum Ársins Virki 2014."*

**Ársins Átak 2014 var MEST. Í grundgeving síni segði dómsnevndin m.a.:**

*"Frá tí vit eru lítil, hoyra vit um tey kappabrøgd, sum okkara forfedrar framdu. Vit hoyra m.a. í kvæðum, ævintýrum og í Føroya Søgu um, hvussu Sigmundur megnaði at svimja úr Skúvoy til Sandvíkar. Vit hoyra um, hvussu norðmenn bygdu stór skip við gyltum stavnum og bláum borðum. Og úr Norrønu gudalæruni hoyra vit søgurnar um kappabrøgdini hjá Tóri og hinum í Ásgarði.*

*Vit fáa kanska eina fatan av, at brøgd eru nakað, sum hoyra fortíðini til. Nakað, sum man mest gjørdi í gomlum døgum. Brøgd verða tó eisini gjørd nú á døgum, tó at tey kanska eru eitt sindur øðrvísi enn fyrr í tíðini. Nútíðina koma vit aftur til seinni.*

*Meðan føroysku hetjurnar eita Brestir, Sigmundur og Húsfrúgvin í Húsavík, hava børn í øðrum pørtum av Evropa lært um nakrar heilt aðrar hetjur. Úr grisku gudalæruni læra tey um kongin yvir øllum gudunum, Zeus, og son hansara Heracles. Heracles var ein kappi fram um allar aðrar, og hann framdi heilt ótrúlig brøgd. Hann var tátíðarinnar superhetja. Mest kendur er hann fyri at fremja tey 12 arbeiðini, har hvørt arbeiði var mestsum eitt bragd í sjálvum sær. Hesi brøgdini snúðu seg ikki einans um styrki, men líka so nógv um eitt hvast vit, og tað skal sigast, at í Gallia var Heracles serliga lýddur fyri síni røðukynstur og sannføringarevni.*

*Søgan sigur eisini, at gudinnan Hera orsakað av svørtsjúku royndi at drepa Heracles sum nýføðing, við at koyra tvær slangur niður í vøgguna har hann lá. Men Heracles tók eina slangu í hvørja hond og kvaldi tær, so atsóknin miseydnaðist. So hann var hvørki sum nýføðingar ella sum fólk flest.*

*Og søgan um tey 12 arbeiðini sigur okkum eisini nakað um, at tað ofta krevur nakað heilt serligt at koma á mál við einum stórarbeiði ella átaki, sum man hevur sett sær fyri. Og navnið Heracles hevur beinleiðis samband við Ársins Átak í ár. Tí griska hetjan Heracles er í dag betri kend undir tí rómverska navninum Herkules.*

*Og Herkules hava øll fólk í Føroyum hoyrt um seinasta tíðina. Við góðum samstarvi hevur tað nevniliga eydnast føroyskum vinnulívi at fáa boripallin West Hercules inn til umvælingar og dagføringar í Føroyum. Tað má sigast at vera eitt bragd at føroyskar fyritøkur nú klára at liva upp til tey mongu og strangu krøv, sum vera sett til eitt sovorðið arbeiðið. Og tað er eisini at bragd at fáa sannført eigararnar av boripallinum um, at tað er rætt at sigla West Hercules inn á Skálafjørðin. Ikki tí at føroyskar fyritøkur ikki eiga at megna eitt slíkt stórarbeiði, men líka so nógv tí hetta ikki er roynt áður.*

*Hetta er eitt átak í orðsins sanna týdningi. Føroyskar fyritøkur hava við MEST og PAM OFFSHORE SERVICE á odda sett øll segl til fyri at fáa hetta at bera til. Men man skilir ikki ordiliga, hvussu stórt hetta átakið er, fyrr enn man sær West Hercules liggja inni á Skálafjørðinum. Hetta arbeiðið er ein sveinaroynd hjá føroyska ídnaðinum og handverksvinnuni. Men samstundis er hetta eitt arbeiði, sum skapar nógv avleitt virksemi fyri aðrar veitarar. Vit hava hoyrt, hvussu m.a. gistingarhús, flutningsfeløg, matstovur, vaktarfeløg og aðrar fyritøkur hava fingið nógv meira at gera, meðan arbeiðið fer fram.*

*Tilsamans skapar hesin boripallur umsetning fyri nógvar 10-tals milliónir í føroyska samfelagnum, og hetta kann verða við til at skapa grundarlag fyri nýggjum vinnumøguleikum í Føroyum. Tað var tí ikki torført hjá dómsnevndini at velja West Hercules sum Ársins Átak 2014, og at geva henda heiður til føroyska høvuðsveitaran, MEST og PAM OFFSHORE SERVICE, sum saman við sínum undirveitarum hevur klárað at framt eitt stórarbeiði.*

*Um vit skulu fylgja søgnini um tey 12 arbeiðini hjá Herkules, er hetta tó bert tað fyrsta arbeiðið. Vit gleða okkum tí at síggja teir næstu 11 pallarnar koma siglandi millum oyggjarnar.*

*Eg vil fegin bjóða stjóranum hjá MEST, Mouritz Mohr, at koma oman her at móttaka heiðurin fyri árins átak 2014. Og tit mugu gjarna geva honum eitt klapp við á vegnum."*

## Gongdin innan ymisku vinnugreinarnar

# *Fiski- og flakavinnan*

### Útflutningurin

Samlaða útflutningsvirðið á øllum fiskavørum var í 2014 uml. 6,2 mia. kr. í mun til uml. 5,8 mia. kr. í 2013. Tað er serliga útflutningsvirðið á alilaksi, sum er vaksið munandi, bæði tí prísurin hevur hildið sær, og tí nøgdin er økt. Útflutningurin av alilaksi vaks við uml. 500 mió kr., so tað hevur verið ein lítil minking í útflutningsvirðinum av veiddum fiski.

Samlaða útflutta tonsatalið av fiskavørum stóð í stað í 2014 í mun til 2013. Tó eru broytingar í býtinum av útflutninginum millum ymisku fiskasløgini, har mest sjónligu broytingarnar eru ein øking í nøgdini av makreli, meðan nøgdin av sild minkaði.

Samlaða útflutningsnøgdin av frystum og køldum flaki, úr toski, hýsu og upsa, var aftur í 2014 nakað lægri samanborið við 2013. Tað var nøgdin av toskaflaki, sum var orsøkin til minkingina, tí nøgdin av flaki av øðrum fiskasløgum stóð í stað, hóast tey framvegis eru á einum sera lágum støði.

Útflutningsvirðið av hesum vørum minkaði meira enn nøgdin, tí miðalprísurin kvinkaði eisini niðureftir. Miðalprísurin fyri saltfisk kvinkaði tó eitt vet uppeftir.

Útflutningurin av heilum fiski stóð eisini í stað, hóast broytingar vóru millum ymisku fiskasløgini, har meira varð útflutt av heilum toski og minni av øðrum fiskasløgum.

### Rávørutilgongdin

Talvan niðanfyri vísir, at nøgdin í føroysku feskfiskaveiðuni aftur minkaði í 2014, og er nú tann sama sum árliga veiðan í ringastu kreppuárunum fyrst í 90'unum. Feskfiskaveiðan var í 2014 knapt 68.000 tons, sum er eini 3.000 tons minni enn í 2013, sum annars var tað lægsta í nógv ár.

Serliga tá tað snýr seg um botnfiskasløgini tosk og hýsu, er framvegis ringur standur. Hóast nøgdin av toski kvinkaði eitt vet uppeftir í 2014, er veiðan framvegis niðanfyri 10.000 tons. Nøgdin av hýsu var óbroytt. Toskur og hýsa eru sum heild stak illa fyri, og fiskiskapurin eftir hesum fiskasløgum er bert ein viðfáningur av, hvat hann var fyri nøkrum árum síðani. Veiðinøgdin av hýsu var í 2003 knøpp 25.000 tons, meðan hon í 2014 bert var góð 3.000 tons.

Nøgdin av upsa minkaði við góðum 2.000 tonsum, og er eisini munandi lægri enn fyri fáum árum síðani, hóast stovnurin sigst at vera hampuliga væl fyri. Nøgdin á flatfiski stóð í stað, meðan nøgdin av øðrum fiskasløgum minkaði við uml. 3.000 tonsum.

Avreiðingartølini higartil í ár geva ikki ábending um nakran bata sum heild, tó at fiskiskapurin eftir toski hevur verið heldur frægari enn sama tíðarskeið í fjør.

Samlaða avreiðingarvirðið av feskfiskaveiðuni var uml. 670 mió. kr. í 2014 í mun til 630 mió. í 2013. Miðal avreiðingarprísurin var sum heild nakað hægri í 2014 í mun til 2013.

| | Nøgd í tonsum | | Virði í 1.000 kr | | Miðalprísur pr. kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2013** | **2014** | **2013** | **2014** | **2013** | **2014** |
| **Toskur** | 9.037 | 9.906 | 112.696 | 140.558 | 12,47 | 14,19 |
| **Hýsa** | 3.169 | 3.196 | 36.932 | 47.454 | 11,66 | 14,85 |
| **Upsi** | 24.560 | 22.109 | 194.663 | 178.477 | 7,93 | 8,07 |
| **Annar botnfiskur** | 103 | 100 | 834 | 990 | 8,11 | 9,88 |
| **Flatfiskur tils.** | 4.069 | 4.179 | 101.338 | 109.749 | 24,90 | 26,26 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 16.262 | 13.076 | 77.201 | 65.309 | 4,75 | 4,99 |
| **Veiðan tilsamans** | 71.875 | 67.969 | 620.445 | 668.510 | 8,63 | 9,84 |

Kelda: www.hagstova.fo

## Flakavinnan

Sum tað sæst í brotinum omanfyri, vóru nøgdirnar av feskfiski undan Føroyum í 2013 á sama støði sum í ringastu kreppuárunum fyrst í 90'unum. Hóast partar av flakavinnuni í eini roynd at bøta um minkandi rávørunøgdirnar hava innflutt frystan fisk úr útlandinum til virkingar, er hetta ein fíggjarliga dýrari loysn. Umframt svikaliga rávørutilgongd er marknaðaratgongdin til aðrar marknaðir verri enn hjá okkara kappingarneytum. Samanumtikið er tí eingin ivi um, at viðurskiftini hjá flakavinnuni eru sera avbjóðandi.

Avbjóðandi karmarnir hjá vinnuni síggjast eisini aftur í fíggjarligu úrslitunum hjá flakavinnuni. Ikki allir roknskapir fyri 2014 hjá flakavirkjunum eru tøkir enn, og hugt er tí eftir tølunum fyri 2013. Um hugt verður eftir ársúrslitunum í 2013 hjá fyritøkunum undir einum, var tilsamans talan um eitt lítið avlop á uml. 9 mió kr. fyri hesar 12 fyritøkurnar. Hóast tað er ov lítið avlop í mun til tær íløgur, sum eru gjørdar, er tað tó tilsamans eitt heldur frægari úrslit enn í 2012.

Á myndini niðanfyri sæst ársúrslitið áðrenn óvanligar postar og skatt hjá 12 fyritøkum, sum virka botnfisk. 6 fyritøkur høvdu avlop, meðan 6 høvdu hall.

**Úrslit hjá 12 fyritøkum í fiskiídnaðinum í 2013**




Kelda: www.vinnuvitan.biz

## Útlitini fyri fiskiskapin komandi fiskiár

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2015/2016 skrivar Havstovan, at upsastovnurin er hampiliga væl fyri, meðan støðan í hýsu- og toskastovnunum er sera ring. Ikki áður í nýggjari tíð hevur tilgongdin av toski og hýsu svikið í so nógv ár á rað, og eingi útlit eru til bata komandi árið. Vit eru í longsta tíðarskeiði við fiskaloysi, ið hagtøl eru tøk fyri (síðani fyrst í 1900-talinum fyri Landgrunnin og 1965 fyri Føroyabanka). Havstovan mælir til at seta álvarslig tiltøk í verk.

Um toskin á landgrunninum skrivar Havstovan, at gýtingarstovnurin hevur verið sera lítil síðani 2004. Stovnurin í 2013 verður mettur at vera uml. 21.000 tons, sum er minsta mark fyri, hvat er ráðiligt. Langtíðarmálið er, at stovnurin í minsta lagi skal vera 40.000 tons. Tilgongdin av 2 ára gomlum toski hevur líka síðani 2001 verið undir miðal, og í 2011-2014 er hon mett at vera sera lítil. Sostatt er eingin ivi um, at toskastovnurin á landgrunninum framvegis er illa fyri.

Havstovan skrivar eisini, at toskurin á Føroyabanka framvegis er illa fyri, og hóast ábending er um lítlan bata, mælir Havstovan

framvegis til, at eingin toskafiskiskapur verður loyvdur á Føroyabanka.

Hýsustovnurin er eisini heilt illa fyri og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Hýsustovnurin hevur síðani 2010 verið undir markinum fyri, hvat er lívfrøðiliga ráðiligt. ICES mælir til onga beinleiðis veiði eftir hýsu, og at hjáveiðan verður avmarkað mest møguligt.

Upsa-gýtingarstovnurin er hampuliga væl fyri og er framvegis omanfyri minstamarkið fyri, hvat er ráðiligt. Veiðutrýstið hevur hesi seinastu árini verið í hægra lagi, men kom í fjør niður ímóti langtíðarmálinum.

Samanumtikið mælir Havstovan til at draga inn allar fiskidagar, sum í fiskiárinum 2013/14 vóru óbrúktir. Orsøkin er, at so skjótt sum stovnarnir eru komnir eitt sindur fyri seg, kann væntast, at hesir dagar verða aktiveraðir, og so kann tað forða einari menning av stovninum. Harumframt mælir Havstovan til at skerja dagatalið hjá bólkunum, sum serliga veiða tosk og hýsu (t.e. bólk 3, 4 og 5), við 50% av teimum brúktu døgunum. Eisini mælir Havstovan til at brúka aðrar reguleringar fyri at geva smáfiski av serliga toski og hýsu betri møguleikar at vaksa seg inn í fiskiskapin.

Viðvíkjandi upsanum mælir Havstovan til, at dagatalið hjá bólki 2, sum serliga fiskar upsa, verður tað sama sum brúkta dagatalið í fiskiárinum 2013/14. Eisini mælir Havstovan til krav um rist í upsatrolum fyri at verja tann smáa upsan.

Samanumtikið mugu vit ásanna, at útlitini fyri fiskiskapin eftir vanligu botnfiskasløgunum eru sera ring, og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðinøgdin av botnfiski undir Føroyum verður á sama lága støði, sum hon hevur verið árini frammanundan.

## Marknaðurin

Keypiorkan á siðbunda ES-marknaðinum er framvegis lág, hóast hon møguliga er nakað frægari enn undanfarna ár. Tá keypiorkan á ES-marknaðinum er avmarkað, hevur tað serliga stóran týdning, at aðrir marknaðir eru opnir fyri føroyskum fiskavørum. Góð marknaðaratgongd er ein fortreyt, um vit vilja tryggja, at vit fáa besta prís og mest virði fyri útflutta fiskin, og harvið eisini tryggja arbeiðspláss í Føroyum.

Hóast ein glotti í farna ári hevur verið við nýggju fríhandilsavtaluni millum Føroyar og Turkaland, hava føroyskir fiskaútflytarar framvegis munandi verri marknaðaratgongd uttanfyri ES enn okkara størstu kappingarneytar. Hetta er eitt mál, sum má raðfestast frammaliga av føroyskum myndugleikum í komandi árum. Sí eisini eitt longri brot um henda spurning á síðu 9 í ársfrágreiðingini.

## Uppisjóvarvinnan

Útflutningurin av uppisjóvarfiski hevur seinastu árini ment seg, partvís sum avleiðing av, at serliga kvotan av makreli er hækkað, fiskiskapurin er mentur, og at íløgur eru gjørdar í fleiri uppisjóvarvirki í Føroyum.

Í talvuni niðanfyri sæst samlaði útflutningurin av uppisjóvarfiski úr Føroyum. Fiskiskapurin er tó størri enn hetta, tí ein partur av uppisjóvarfiskinum verður nýttur til framleiðslu av fiskamjøli. Mest vanligi útflutningurin er antin heilfrystur fiskur ella avhøvdaður og kruvdur fiskur.

Í talvuni sæst, at nøgdin á útfluttum makreli øktist úr góðum 93.000 tonsum í 2013 upp í góð 116.000 tons í 2014. Hetta er ein vøkstur á 25 %. Prísurin, sum fekst fyri makrelin, var tó ikki líka góður í 2014 sum í 2013, og tí øktist útflutningsvirðið av makreli bert við 9 %.

Útflutningurin av sild minkaði úr sløkum 64.000 tonsum í 2013 niður í 42.382 tons í 2014. Tað er ein minking við einum triðingi í mun til útflutningin árið fyri. Miðalprísurin á sild kvinkaði uppeftir í 2014, men framvegis minkaði sildaútflutningurin við uml. 120 mió. kr. í mun til árið fyri.

Útflutningurin av svartkjafti vaks nakað, úr sløkum 33.000 tonsum í 2013 upp í 35.000 tons í 2014. Orsakað av eini munandi minking í miðalprísinum á svartkjafti minkaði útflutningsvirðið tó við uml. 24 mió. kr. ella 18 % í mun til árið fyri.

Tilsamans var talan um ein lítlan vøkstur í nøgdini av mest vanligu uppisjóvarfiskasløgunum. Miðalprísurin fyri hesi trý fiskasløgini var tó tilsamans slakari í 2014 enn árið fyri, og tí minkaði samlaða útflutningsvirðið við 70 mió. kr. í mun til 2013.

## Útflutningurin av týdningarmestu sløgunum av uppisjóvarfiski

| | Nøgd í 1000 tons | | Virði í 1.000 kr | | Miðalprísur kr. pr kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2013** | **2014** | **2013** | **2014** | **2013** | **2014** |
| **Makrelur** | 93.181 | 116.306 | 814.474 | 886.644 | 8,74 | 7,62 |
| **Sild** | 63.733 | 42.382 | 410.093 | 291.623 | 6,43 | 6,88 |
| **Svartkjaftur** | 32.759 | 35.061 | 133.307 | 109.724 | 4,07 | 3,13 |
| **Fiskasløgini tils.** | 189.672 | 193.749 | 1.357.874 | 1.287.991 | 7,16 | 6,65 |

Kelda: www.hagstova.fo

# *Havbúnaður*

## Framleiðsla

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í 2014 góð 70.000 tons í kruvdari vekt. Í rundari vekt svarar hetta til eina tøku á góð 86.000 tons.

Framleiðslan í 2014 var sostatt væl hægri enn í 2013, tá havbúnaðurin framleiddi góð 62.000 tons í kruvdari vekt. Vøksturin var 12 %.

Karmarnir kring alivinnuna eru sum heild góðir, og vinnan hevur seinastu árini havt góð úrslit, tá hugt verður at vøkstri, fóðurfaktori, sjúkustøðu og framleiðslukostnaði. Fellið er eisini á einum lágum støði, men hevur tó verið hækkandi seinastu árini. Saman við skynsamari lívfrøðiligari stýring hevur ein høgur laksaprísur eisini havt við sær, at feløgini hava havt góð fíggjarlig úrslit í 2014. Góðu fíggjarligu úrslitini hava eisini haft við sær, at havbúnaðurin hevur møguleika at gera íløgur í framleiðslutólini. M.a. verða íløgur gjørdar í útbygging av smoltstøðunum, nýggjum brunnbátum o.a. Slíkar íløgur eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan, og at geva møguleikar fyri at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt.

Í 2014 vórðu umleið 14,7 mió. smolt sett út í Føroyum. Hetta er væl meira enn í 2013, tá umleið 13,7 mió. smolt vórðu sett út. Í 2015 minkar samlaða framleiðslan av laksi frá føroyskum havbúnaði tó væntandi nakað (uml. 3-5 %), m.a. orsakað av náttúrligu sveiggjunum í framleiðsluni.

### Tøka av laksi og sílum (rund vekt) 2000 - 2014 (1.000 tons)




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 1,315 | 3,126 | 11,149 | 10,220 | 5,092 | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 |
| Laks | 33,508 | 46,014 | 44,953 | 52,526 | 40,985 | 18,962 | 13,083 | 22,305 | 38,851 | 51,500 | 45,410 | 60,497 | 76,803 | 75,852 | 86,489 |

Kelda: www.hagstova.fo

## Lívfrøðiligir váðar

Laksalúsin er framvegis ein trupulleiki fyri føroyska aling, eins og hon er í laksaframleiðslu kring allan heimin. Feløgini hava gjørt avtalur um felags avlúsingar, sum innibera, at feløgini avlúsa samstundis og býta vitan og úrslit sínamillum. Fyri at minka um tørvin á avlúsingum, eru feløgini farin undir at nýta rognkelsi at halda lúsatalinum

niðri. Í 2014 vórðu tey fyrstu rognkelsini sett út í føroyskar aliringar, og væntað verður, at fleiri royndir við rognkelsum verða gjørdar í ár. Tað er ov tíðliga at siga við vissu, hvørja ávirkan rognkelsini fara at hava á lúsatalið, men royndirnar higartil hava verið góðar. Eisini onnur tøkni verður roynd fyri at minka um tørvin á avlúsingum.

## Skattur og avgjøld

Í 2014 varð nýggj skipan um loyvisskatt fyri havbúnað sett í verk. Hon snýr seg í stuttum um, at fyritøkurnar umframt vanliga partafelagsskattin skulu gjalda eitt tøkugjald á 0,5% av marknaðarvirðinum av tøkuni umframt 4,5% eykaskatt av yvirskotinum. Fyri at fáa stabilar og kendar karmar um virksemið komandi árini, tók Havbúnaðarfelagið undir við tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum, sum gjørdi tilmæli um loyvisskatt á havbúnaðin, treytað av, at einkarrætturin hjá apotekinum verður avtikin.

## Søla og marknaðarútlit

Søluvirðið øktist úr 2,4 mia. kr. í 2013 upp í góðar 2,9 mia. kr. í 2014, og stendur føroyskur havbúnaður nú næstan fyri helvtini av samlaða føroyska vøruútflutninginum. Í talvuni niðanfyri sæst gongdin í útflutninginum frá føroyskum havbúnaði.

Føroyska alivinnan marknaðarførir føroyskan laks sum eina hágóðsku fiskavøru, og prísurin sum føroyskur laksur fær á marknaðinum er eisini hægri pr. kg. í mun til laksin hjá fremstu kappingarneytunum. Seinastu árini er alsamt størri parturin av føroyska laksinum seldur til marknaðir uttanfyri Evropa, eitt nú Rusland, USA og Kina. Í 2004 varð 90 % av laksinum útfluttur til ES, í 2009 var hetta minkað til 69%, og í 2014 vórðu 41% útflutt til ES. Eftir 10 árum er marknaðarparturin til ES sostatt minkaður við meira enn einari helvt, og tað er eisini serliga uttanfyri Evropa, at vøksturin í søluni er eyðsýndur í hesum tíðum.

Globala framleiðslan av laksi øktist við uml. 8% í 2014, men hóast hetta helt prísurin sær. Globala framleiðslan av laksi veksur væntandi ikki líka nógv í ár. Samstundis veksur eftirspurningurin á nýggjum marknaðum skjótt, og vøkstur er eisini á siðbunda evropeiska marknaðinum. Marknaðarútlitini eru tískil góð, og prísurin á laksi verður væntandi lutfalsliga góður í 2015. Laksaprísurin hevur tó søguliga sæð sveiggjað nógv, og tí kunnu koma tíðarskeið, tá tað kann gerast torført at vinna pening á marknaðinum.

## Útflutningsvirðið frá føroyskum havbúnaði 2003-2014 (1000 kr.)




Kelda: www.hagstova.fo

# *Handverksvinnan*

## Gongdin í byggivinnuni

### Innflutningurin av byggitilfari

Myndin niðanfyri vísir innflutningin av tilfari og lutum til byggivinnuna seinastu 10 árini. Eins og virksemið í byggivinnuni er vaksið í 2014 í mun til 2013, er innflutningurin av byggitilfari eisini økt. Vøksturin er umleið 12 % í mun til 2013.




Kelda: www.hagstova.fo

### Talið á nýbyggingum

Tað finst eingin fullfíggjað sethúsa- ella bygningsskráseting, og besta ábendingin um, hvussu nógv sethús eru bygd í einum ávísum ári, fæst tí við at hyggja eftir skrásetingum hjá SEV, viðvíkjandi gjøldum fyri (ný)íbindingar í elkervið. Henda skráseting er bólkað í sethús og "annað", sum fevnir um vinnu- og almennar bygningar, íbúðir, neyst, úthús o.a. umframt víðkanir viðvíkjandi verandi innleggingum.




Kelda: SEV.

Talvan nýbygging 2000-2014 vísir, at talið á nýbyggingum í 2014 gjørdist tað lægsta higartil í hesari øldini, og fimta árið á rað var ein minking í talinum á nýbygdum sethúsum. Talið á nýbygdum sethúsum minkaði úr 132 í 2013 til 71 í 2014. Bólkurin "annað" er fyri fyrstu ferð hægri enn sethús, hesin bólkurin vaks úr 64 í 2013

til 86 í 2014. Sostatt bendir á, at í 2014 vóru bygd fleiri íbúðir enn sethús.

Samlaða talið av íbindingum í 2014 var 157, ímóti 196 í 2013.

Talvan niðanfyri vísir byggingina sundurgreinaða í økir, og her sæst, at tað framvegis er í Streymoyarøkinum, at flest sethús vera bygd.

| | 2013 | | 2014 | |
|---|---|---|---|---|
| | Sethús | Annað | Sethús | Annað |
| Norðoyggjar | 6 | 10 | 6 | 7 |
| Eysturoy | 12 | 16 | 21 | 19 |
| Streymoy | 95 | 22 | 32 | 40 |
| Vága | 14 | 8 | 7 | 6 |
| Sandoy | 0 | 0 | 2 | 1 |
| Suðuroy | 5 | 8 | 3 | 13 |
| **Allar Føroyar** | **132** | **64** | **71** | **86** |

Kelda: SEV.

Tað er tó merkisvert, at ímeðan talið av nýbygdum sethúsum í Eysturoy nærum tvífaldaðist, so minkaði talið við tveimum triðingum í Streymoyarøkinum. Samstundis tvífaldaðist bólkurin "Annað" í Streymoyarøkinum.

Vøksturin í 2014 er sostatt at finna í øðrum enn sethúsabygging. Tað er at fegnast um, at bæði privat og almenn bygging veksur, og at støðan í byggivinnuni tí batnar. Ein fortreyt fyri, at økta virksemið heldur fram, er tó, at tað verða føroyskar fyritøkur, sum vinna komandi útbjóðingarnar.

## Útlit fyri handverksvinnuna

Sum heild eru útlitini hjá byggivinnuni fyri 2015, eins og 2014, frægari enn í árunum frammanundan, har tað hjá nógvum fyritøkum mest snúði seg um at koma gjøgnum kreppuna, til tíðirnar gjørdist betri.

Tað kann gerast ein avbjóðing at finna faklærda arbeiðsmegi í Føroyum til allar hesar verkætlanir, tí eitt stórt tal av handverkarum hava leitað sær arbeiði í Noregi og aðrastaðni, meðan virksemið í byggivinnuni í Føroyum var so lítið. Tað er tó ein bati, at Løgtingið hevur samtykt at lætta um atgongdina at fáa handverkarar úr ES til Føroya at arbeiða. Í teirri løtu, arbeiðsloysið í 3 fylgjandi mánaðir hevur verið omanfyri 3,5 %, men niðanfyri 6 %, eru tað tó bara fyritøkur í byggivinnuni, sum kunnu fáa ES-arbeiðsmegi inn eftir nýggju reglunum. Hetta merkir at t.d. maskinverkstøð, bilverkstøð, kokkar til matstovur og onnur, sum ikki arbeiða beinleiðis innan byggivinnuna, kunnu hava torført við at fáa mannað ósett størv. Hetta er ein skeivleiki, sum eigur at vera rættaður.

Avbjóðingar eru eisini fyri framman viðvíkjandi útbjóðing av byggiverkætlanum.

Bústaðir er ein nýggjur byggiharri á marknaðinum, sum ætlar at byggja nógvar íbúðarbygningar komandi árini. Tað er tí serliga týdningarmikið, at hesar útbjóðingar eru lagdar væl til rættis, so teir bjóðandi føla seg tryggar við útboðsgrundarlagið og mannagongdir. Tíverri hava royndirnar higartil verið, at hesar útbjóðingar ikki virða grundleggjandi siðvenjur, og økir hetta um óvissu og váða hjá teimum, sum bjóða. Hetta er hvørki til gangs fyri byggiharran ella entreprenørarnar, sum skulu byggja bygningarnar. Handverksvinnan hevur tí heitt á Bústaðir um at bera so í bandi, at útbjóðing fer fram sambært galdandi siðvenjum.

Sum heild eru trupulleikarnir ikki líka stórir í útboðum hjá Landsverki. Tó er Landsverk byrjað við sonevndum ESCO útbjóðing, har ábyrgdin fyri at fíggja íløguna í stóran mun verð løgd á entreprenørin, sum so fær eitt árligt gjald í eitt áramál. Hetta merkir samanumtikið dýrari fígging í mun til støðuna, har landið sjálvt fíggjar íløguna, og bjóðar arbeiðið út á vanligan hátt. Harumframt verða tað neyvan føroyskar fyritøkur, sum Landsverk fer at gera ESCO-sáttmálar við. Útboðstilfarið er gjørt av dønum, á donskum málið, til danskar fyritøkur. Heldur henda gongd fram, so er ikki lív lagað hjá føroyskari vinnu og tað verður trupult at økja um vitanarstørvini í landinum, sum eru bráneyðug fyri fólkavøksturin í landinum.

Eisini varð ein frágreiðing um virksemið hjá Landsverki handað landsstýrismanninum herfyri. Vinnuligu sjónarmiðini vóru m.a., at Landsverk við tíðini avmarkar sín leiklut á marknaðinum til bert at keypa vørur og tænastur frá vinnuni, og at Landsverk, í sambandi við útbjóðingar, heldur seg til yvirskipaðar reglur, so sum ABF06.

Í dag útinnir Landsverk entreprenørvirksemi á fleiri økjum, so sum viðlíkahald av landsvegum og tunlum, fresing og asfaltering, vetrarhald á landsvegunum, umfram framleiðslu og sølu av gróti, skervi og asfalti. Hetta er ein stórur marknaðarpartur, sum Landsverk situr á, og sum eigur at blíva útveittur. Vinnan hevur ta greiðu fatan, at jú meira av entreprenørvirksemi Landsverksins verður útveitt, jú fleiri fyritøkur hava møguleikan at sleppa framat, og hetta eggjar eisini til at nýggjar fyritøkur kunnu spíra. Hetta er gott fyri kappingina og samstundis fyri kostnaðarstøðið á tí arbeiði, sum Landsverk bjóðar út. Soleiðis eigur Landsverk at keypa vørur og tænastur frá vinnuni, heldur enn at átaka sær sjálvum entreprenøruppgávur.

## *Shippingvinnan*

Við alsamt størri virksemi í vinnugreinini er shippingvinnan nú ein av størstu vinnugreinunum í landinum. Í 2009 vóru gott 30 skip skrásett í FAS, og nú í 2015 er talið knapt 90 skip.

Hvussu lønirnar, sum eru útgoldnar undir FAS, eru øktar hesi árini, sæst týðiliga á grafinum niðanfyri.

**Lønarinntøkur undir FAS (1.000 kr)**




Kelda: Taks

Lønarinntøkurnar eru øktar við meira enn 100 %, og er FAS skipanin sostatt eitt munandi ískoyti til peningarenslið inn til Føroya.

Tíverri má staðfestast, at allir teir ymsu partarnir av vinnugreinini hava svikaligar inntøkur, og hetta rakar fyri tíðina serliga frálandapartin.

Hóast vinnan tekur undir við Maritime Labour Convention, hevur sáttmálin við sær ásetingar, sum krevja tillagingar frá vinnuni, og hesar tillagingar eru ikki ókeypis. Harafturat eru eisini komin nýggj krøv til low sulphur fuel, og serliga skip í SECA-øki[1] eru hart rakt av hesum.

Fyri vinnugreinina snýr tað seg tí um framhaldandi at vera kappingarfør í mun til reiðaríir undir øðrum flaggi. Umframt at vinnan sjálvsagt javnt tillagar seg til umstøðurnar, so hevur tað, sum nevnt er fleiri ferðir áður, týdning, at føroysk lóggáva, reglur og umsiting ikki leggur óneyðugar byrðar á vinnuna. Tað eru millum annað viðurskifti í sambandi við FAS, sum eiga at verða dagførd, soleiðis at føroysk skip kunnu kappast á jøvnum føti við onnur. Her kann verða nevnt, at lógarverkið eigur at verða víðkað, soleiðis at tað eisini fevnir um eftirlitsfólk undir bygging, vísindafólk v.m.

Reiðarafelagið fyri Farmaskip gjørdist í september 2014 limur í International Chamber of Shipping (ICS), og formaður felagsins luttók fyrstu ferð á nevndarfundi í ICS í februar í ár.

ICS er altjóða felagsskapur fyri reiðarafeløg kring heimin. Felagsskapurin er virkin í mun til IMO og eisini í mun til ITF. Tí væntar RFF, at limaskapurin her kann fáa týdning framyvir.

Trupulleikin, við at føroyska flaggið er lýst sum Flag of Convenience í ITF høpi, er framvegis ikki loystur. Hóast lóg um FAS er broytt soleiðis, at føroysk fakfeløg nú eisini kunnu vera partur í sáttmálum við útlendingar, røkist einki fyri, at ITF fer at broyta støðu. Føroyska røddin í ITF eru føroysku manningarfeløgini, og tað tykist tíverri ikki at liggja teimum frammarlaga at fáa loyst trupulleikan. Samstundis sum manningarfeløgini eiga at gera sítt til, at ITF broytir støðu, so hava allir partar eina skyldu at tryggja, at føroyska flaggið verður verandi eitt góðskuflagg.

Arbeiðið við at fáa eina aspirantskipan at virka er nú komið heilt langt, og í august kunnu væntandi fyrstu aspirantarnir verða tiknir inn. Tað hevur higartil verið ein trupulleiki, at komandi yvirmenn

[1] SECA-økið fevnir um Eystursjógvin, Norðsjógvin og ensku kanalina

eru lidnir við teoretiska partin av útbúgvingini uttan at hava siglingstíð. Tí er aspirantskipanin eitt stórt stig framá leið, og hetta er at fegnast um.

Eisini er tað positivt, at skeiðsmøguleikarnir í Føroyum fyri manningar við handilsskipum eru vorðnir betri og framhaldandi batna. Hetta er til stórt gagn fyri vinnuna, fyri sjófólki og ikki minst fyri samfelagið.

Samanumtikið er at siga, at menningin av FAS hevur økt talið av skrásettum skipum í FAS munandi. Umframt øktar inntøkur hjá sjófólki, so hevur hetta ført við sær munandi størri virksemi á landi. Avleidda virksemi er fjølbroytt, men her kunnu eitt nú verða nevnd reiðarívirksemi, skeiðsvirksemi umframt trygging og fígging av virksemi og skipum hjá limunum. Shippingvinnan hevur tó stórar avbjóðingar í komandi tíðum. Ávís viðurskifti eru, sum ganga rætta leið, men tað er neyðugt alla tíðina at halda sær fyri eyga, at reglur, mannagongdir og lóggáva í Føroyum ikki virkar kappingaravmarkandi fyri føroysk reiðarí.

## Oljuvinnan

Borað varð í tveimum brunnum í 2014, men í hvørgum brunninum varð kolvetni funnið. Statoil hevur eftir hetta avgjørt at lata trý loyvir inn aftur til Jarðfeingi. Í løtuni eru sostatt trý loyvir á føroyska landgrunninum, har Statoil og Dong eru loyvishavarir.

Leitivirksemi hevur verið á føroyska landgrunninum í eini 15 ár, og níggju brunnar eru boraðir, tó uttan lønandi oljufund. Jarðfeingi hevur ta áskoðan, at fleiri øki eiga at verða kannað, og at góðir møguleikar eru at finna olju í rakstrarverdum nøgdum. Lágur oljuprísur merkir, at verandi løta ikki er tann rætta at bjóða leitiloyvi út. Landstýrismaðurin hevur boðað frá, at í 2017 verður aftur møguligt hjá oljufeløgum at fáa nýggj loyvir til at leita eftir olju undir Føroyum, og at hesi verða boðin út eftir open-door skipanini.

Fyritaksemið innan frálandavinnu í Føroyum er komið á eitt vegamót, nú ongin nýggj leitiboring er fráboðað. Tað tykist, at oljuvinnan er farin frá at upparbeiða eina oljuframleiðslu í Føroyum, til at veita tænastur til oljuvinnuna. Hetta fer eitt nú at koma til sjóndar á samskipanini av messuluttøkuni á Offshore Europe 2015 í Aberdeen. Fyrireikingar til messuna draga seg um eitt átak, sum skal staðseta Føroyar sum eina maritima tænastustøð fyri frálandavinnuna og alla skipaferðslu, sum siglur framvið Føroyum.

Umvegis tær níggju boringarnar í Føroyum og vitjanina hjá West Hercules er prógvað, at tænastuvinnan her heima er væl og virðiliga kappingarfør á altjóða stigi.

## KT-vinnan

Gongdin í KT-vinnuni hevur verið nakað misjøvn hesi seinastu árini. Í fjarskiftisvinnuni hevur gingið stak væl hóast munandi lækkingar í prísunum á telefoni. Í KT-vinnuni annars eru úrslitini rættuliga ymisk, har summar fyritøkur hava klára tað væl, meðan aðrar hava staðið seg minni væl í 2014.

Føroyar eru sum lítið norðurlendskt samfelag serstakliga væl egnaðar at menna nýggjar KT-skipanir í. Hesar skipanir eiga at verða mentar soleiðis, at tær kunnu verða seldar uttanfyri landoddarnar, tí landafrøðiliga nýtist KT-vinnan ikki neyðturviliga at vera tengd at marknaðinum í Føroyum. Hetta merkir í roynd og veru, at møguleikarnir eru markleysir, og at vøksturin í føroyska búskapinum ikki eina nýtist leggja lunnar undir vøksturin í KT-vinnuni. Føroyar sum smátjóð hava við sær teir fyrimunir, at skipanir lættliga kunnu verða mentar, royndarkoyrdar og betraðar innlendis við tí fyri eyga at selja hesar uttanlands. Skipanirnar kunnu tá verða mentar innan lutfalsliga smáu karmarnar í Føroyum, har stutt og einfalt er at samskifta millum partar, samstundis sum ein samfelagslig heild fæst við í menningina.

Fyri framman eru fleiri avbjóðingar. Millum annað hava KT-fyritøkur fyrr víst á, at trupult er at fáa

serfrøðingar heim til Føroya at arbeiða innan KT-vinnuna. Fær KT-vinnan ikki atgongd til hesar førleikar, so kann tað tarna vøkstrinum í vinnuni. Álitið um fólkavøkstur nevnir eina loysn við at gera eina serfrøðingaskattaskipan, ið eggjar serfrøðingum til Føroya við einum tíðaravmarkaðum skattalætta. Tílikar skipanir finnast í øðrum Norðurlondum og eiga ikki at vera truplar at seta í verk. Vinnan vónar tískil, at politiska skipanin tekur neyðugu stigini fyri at tryggja, at føroyskar KT-fyritøkur standa seg í hørðu kappingini við útlendskar fyritøkur.

KT-vinnan hevur leingi víst á, at Føroyar skjótt kunnu gerast eftirbátur á KT-økinum, um neyðugu íløgurnar ikki vera gjørdar í KT-undirstøðukervið.

Tað er tí at fegnast um, at verkætlanin Talgildu Føroyar er ígongd. Føroyska KT-vinnan er klár at taka ímóti avbjóðingini og vísir á týdningin av føroyskum loysnum. Hetta tí at føroysku KT-fyritøkurnar kenna best umhvørvið og duga eisini best at finna røttu loysnirnar til tørvin. Samstundis hevur tað alstóran týdning, at teir førleikar og tann vitan, sum føroysku KT-fyritøkurnar hava uppbygt, verða verandi í landinum fyri at framtíðartryggja kappingarføri. Harumframt hevur tað alstóran týdning, at fíggjarlig játtan fylgir við verkætlanini Talgildu Føroyar, og at tað almenna bjóðar út KT-arbeiði. Á sama hátt, sum í øðrum vinnum er tíðningarmikið, at hesi útboð verða á føroyskum málið.

## Samskiftisvinnan

Fíggjarkreppan, sum hevur leikað seinastu árini, hevur stórliga merkt samskiftis- og lýsingarvinnuna. Í 2014 hevur tó verið meira støðugt virksemi í samskiftisvinnuni.

Tað eru tveir stórir veitarar á marknaðinum saman við einum støðugum talið av minni veitarum – í fleiri førum einstaklingavirkir.

Vegna vantandi hagtalsgrundarlag er torført at vísa á ein ítøkiligan vøkstur ella fall í vinnugreinini, men afturmeldingar frá vinnuni eru, at talan er um ein størri eftirspurningur í 2014 samanborið við undanfarnu árini. Teir stóru veitararnir hava í 2014 minkað um starvsfólkatalið, so hetta samsvarar við uppgávur og kundar.

## Ráðgevaravinnan

Eftir eitt tíðarskeið við fáum uppgávum við niðurlaging av ráðgevaravinnuni sum fylgju, er virksemið í vinnugreinini veruliga við at taka seg uppaftur.

Talið av ráðgevaravirkjum og starvsfólkum í vinnuni í Føroyum er vaksandi og ber hetta boð um vaksandi eftirspurning eftir ráðgevaratænastum.

Føroyska ráðgevaravinnan hevur drúgvar royndir og breiða vitan um øll sløg av arbeiðum, sum tørvur er á at fáa gjørt í Føroyum. Ráðgevaravinnan strembar eftir, at hetta eisini í framtíðini verður so, tí fyrimunirnir eru nógvir. I fyrsta lagi verða vitanarstørv varðveitt í landinum, og í øðrum lagi er ráðgevingin smidligari, tá hon verður veitt í nærumhvørvinum.

Í triðja lagi eru føroysku tímatakstirnir lægri enn i grannalondunum. Harafturat kemur, at føroyska samfelagið hevur stórt gagn av, at vitanin um at byggja bygningar og aðra nýgerð eftir føroysku fortreytum verður varðveitt og ment her á landi.

Hugstoytt er tó, at tað meira enn so kemur fyri, at almennir myndugleikar velja at veita ávísar uppgávur av landinum, sjálvt um vitan og førleiki er at loysa hesar í Føroyum. Hetta er ikki í lagi og verður mælt til, at almennu myndugleikarnar leggja á annan bógv.

Ráðgevarafelagið hevur arbeitt støðugt við at fáa gjøgnumskygni í sambandi við tilluting og døming av útboðum. Smáir batar hava verið at sæð, men enn manglar nakað áðrenn støðan er nøktandi.

## *Handilsvinnan*

Innflutningurin til handilsvinnuna fór eitt vet upp í 2014 í mun til 2013. Samlað sæð er innflutningurin til handilsvinnuna vaksin rættiliga støðugt seinastu árini.

### Gongdin á samlaða innflutninginum til Føroya

| Innflutningur, (1.000 kr.) | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Allur innflutningur | 4.369.891 | 5.278.862 | 6.682.948 | 6.273.100 | 5.970.986 | -302.114 | -4,8% |

Kelda: Hagstova Føroya

## Ódrúgvar vørur

Sum tað sæst á talvuni niðanfyri, hevur innflutningurin av matvørum verið støðugt vaksandi síðani 2010. Vøksturin á mati, drykkivørum og tubakki er tó nakað størri í 2014 í mun til 2013 enn hann hevur verið undanfarin ár.

| Ódrúgvar nýtsluvørur, (1.000 kr.) | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Matur, drykkjuvørur og tubbak | 511.308 | 526.927 | 547.173 | 559.179 | 598.704 | 39.525 | 7,1% |
| Aðrar ódrúgvar nýtsluvørur | 135.838 | 133.922 | 131.110 | 135.072 | 142.187 | 7.115 | 5,3% |

Kelda: Hagstova Føroya

## Drúgvar og hálvdrúgvar vørur

Innflutningurin av drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum er sum heild vaksin í mun til 2013.

| Hálvdrúgvar nýtsluvørur, (1.000 kr.) | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Klæðnavørur | 119.507 | 120.115 | 124.062 | 133.784 | 133.066 | -717 | -0,5% |
| Fótbúnaður | 25.605 | 25.211 | 26.897 | 27.757 | 29.493 | 1.736 | 6,3% |
| Aðrar hálvdrúgvar nýtsluvørur | 166.642 | 166.775 | 169.164 | 183.265 | 199.394 | 16.129 | 8,3% |

Kelda: Hagstova Føroya

| Drúgvar nýtsluvørur (1.000 kr.) | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuakfør | 34.060 | 52.105 | 54.304 | 80.795 | 87.583 | 6.788 | 8,4% |
| Persónbilar | 93.131 | 106.520 | 158.707 | 198.052 | 219.242 | 21.190 | 10,7% |
| Onnur akfør, húsvognar & smábátar | 10.630 | 9.228 | 14.272 | 13.400 | 15.525 | 2.125 | 15,9% |
| Aðrar drúgvar nýtsluvørur | 150.898 | 151.951 | 151.207 | 163.016 | 168.987 | 5.972 | 3,7% |

Kelda: Hagstova Føroya

Innflutningstølini vísa, at innflutningurin er vaksin væl meira frá 2013 til 2014 enn undanfarin ár. Hetta ber boð um ein øktan eftirspurning í 2014 í mun til undanfarin ár.

Sum avleiðing av fíggjarkreppuni tálmaðu fyritøkur í handilsvinnuni rakstrarútreiðslurnar á øllum økjum. Serliga vórðu marknaðarførings-útreiðslurnar skornar, men eisini lønarútreiðslurnar minkaðu hetta tíðarskeiðið. Sambært fyritøkunum er marknaðurin ikki so óstøðugur, sum hann var í tíðarskeiðinum 2008 - 2010, men kappingin í vinnuni hevur gjørt, at aktørarnir eru færri og eindirnar størri. Hetta hevur rationaliserað raksturin millum annað við tað, at fleiri handlar virka undir somu umsiting.

## Søla av bilum

Sølan av bilum gevur vanliga eina ábending um, hvussu búskapurin hevur tað, og um vanligi brúkarin hevur álit á framtíðina.

Tað er líkt til, at støðan er vorðin betri seinastu árini. Sølan av nýggjum bilum í 2014 er vaksin við 18,8 % í mun til 2012. Sølan er nú farin upp um støðið í 2008, tá 1.948 nýggj akfør vórðu seld. Samlaði innflutningurin øktist úr 198 mió. kr. í 2013 til 219 mió. kr. í 2014.

| Nýggj akfør seld | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stk. | 1053 | 1218 | 1527 | 1852 | 2201 | 349 | 18,8% |

Kelda: Akstovan

# *Ferðavinnan*

Ferðavinnan í Føroyum tykist at vera í støðugum vøkstri. Talið á gistingum er vaksið, og umsetningurin í vinnuni er á eini góðari leið. Gistingarhúsini hava havt tørv á at byggja út, og nýggj gistingarhús hava latið upp. Sambært tølum hjá Hagstovu Føroya er gistingarorkan hjá gistingarhúsunum í 2014 vaksin við 14 % í seingjartali og 11 % í kamarstali.

Sólarmyrkingin, sum var 20. mars 2015, hevur fylt nógv í vinnuni tað seinasta árið. Nógv fyrireiking var til tess at fáa sum mest burturúr hesi hending, sum er ein tann størsta í føroyskari ferðavinnu. Tað er at fegnast um, at føroyska ferðavinnan megnaði uppgávuna, og at tað nú er sjón fyri søgn, at tað er møguligt at skipa fyri hendingum og tiltøkum av hesi støddd á Føroya landi. Nýggjastu tølini frá Hagstovu Føroya vísa, at uml. 11.400 ferðafólk komu til Føroya í sambandi við sólarmyrkingina, og at hesi ferðafólk keyptu vørur og tænastur fyri næstan 111 mió. kr. Hetta er 121 % meiri enn í mars 2014.

## Gistingarnætur í 2014

| Land | Íalt 2014 | Íalt 2013 | Munur í % |
|---|---|---|---|
| **Øll lond** | **137.510** | **128.767** | **7%** |

| Ovastu 8 londini | Íalt 2014 | Íalt 2013 | Munur í % |
|---|---|---|---|
| Danmørk | 48361 | 48087 | 0,6% |
| Føroyar | 34395 | 36666 | -6,2% |
| Noreg | 12007 | 8012 | 49,9% |
| Týskland | 6913 | 7249 | -4,6% |
| Ísland | 4510 | 5182 | -13,0% |
| Bretland | 4593 | 4602 | -0,2% |
| Svøríki | 5009 | 3475 | 44,1% |
| Italia | 1840 | 1548 | 18,9% |

Kelda: Hagstova Føroya

Sambært tølunum hjá Hagstovuni eru gistingarnæturnar øktar við 7 % í 2014. Størsti vøksturin er í norsku og svensku gistingunum. Við góðum ferjusambandið og nýggju NORÐ rutuni loftvegis er lætt at koma til Føroya úr okkara nærmastu grannalondum. Økta virksemið, ið stóðst av, at West Hercules varð umvældur í Føroyum, er eisini ein orsøk til markanta vøksturin í norsku gistingunum í 2014.

### Gistital (belegningur) 2014




Kelda: Hagstova Føroya

Talvan vísir, hvussu gistitalið hevur verið á gistingarhúsunum gjøgnum árið. Meðal gistitalið fyri árið er 44 % júst sum í 2013. Ein orsøk til, at vøksturin í gistingarnætunum ikki sæst aftur í gistitalinum, er, at fleiri kømur eru komin afturat í 2014. Hóast talvurnar fyri 2013 og 2014 tískil eru rættiliga líkar, er ein munur tó, at gistitalið í mai, august og september er hækkað í mun til í 2013. Hetta kundi borið boð um, at háárstíðin í ferðavinnuni er í ferð við at verða víðka til eisini at fevna um mai og september.

Hagstova Føroya hevur nú á fyrsta sinni kannað búskaparliga týdningin av føroysku ferðavinnuni. Sambært hesum tølum, sum tó enn bert eru tøk fyri 2013, var umsetningurin til útlendsk ferðandi 577 mió kr, og ársverkini í vinnuni mett at verða 331, men tá eru bert flutningsfeløg, ferðaskrivstovur, gistingar og gistingarhúsvirksemið tikin við. Matstovur, upplivingarveitarar og ferðaleiðarar eru ikki roknað uppí.

Støðan í ferðavinnuni sær sostatt positiv út í løtuni, og varhugin er, at góða gongdin fer at halda fram í 2015.

## *Ídnaðarvinnan*

Føroyska ídnaðarframleiðsluvinnan hevur í mong ár verið undir stórum kappingarligum trýsti frá líknandi vørum frá øðrum marknaðum. Hetta hevur merkt, at talið á fyritøkum innan ídnaðarframleiðslu er fallið munandi seinastu 30 árini.

Seinastu árini hevur ídnaðarvinnan tó stabiliserað seg nakað og tað eru fleiri fyritøkur, sum hava rættiliga gott fótafesti á føroyska marknaðinum. Gleðiligt er, at tær hava stóran marknaðarpart í Føroyum, sjálvt um tær eru í sera harðari kapping við útlendskar vørur.

Rákið at keypa lokalt og denturin á at nýta uppruna vørur er eisini komin hesum partinum av vinnuni til góðar. Serliga eru tað føroyskar matvørur, sum eru eftirspurdar og er tað tilvitanin frá føroyskum kokkum og ferðavinnuni, sum hevur viðvirkað til øktan eftirspurning. Tá tað kemur til matvørur, sum er annað enn fiskur, er tað tó trupult hjá føroyskum fyritøkum at víðka um sítt virksemi við útflutningi, tí londini kring

okkum hava gjørt avtalu við t.d. ES um heilsufrøðiligar karmar fyri hesa framleiðslu. Slíka avtalu hevur Føroyar ikki.

Tá tað kemur til aðrar ídnaðarvørur so sum vaskievnir, prentlutir o.l. eru fyritøkurnar undir sera stórum kappingartrýsti frá útlendskum vørum.

Prentsmiðjurnar hava í fleiri ár verið í tungum sjógvi. Framgongdin í samfelagnum annars sæst ikki væl aftur í hesum partinum av vinnuni. Serliga er kappingin úr útlandinum hørð. Á prentøkinum manglar ásannanin, at tá vit keypa føroyskt, gerst samfelagið liviligt fyri okkum øll.

Tó er at fegnast um, at Dimmalætting nú aftur kemur út, og tí hava vit eitt grafiskt arbeiðspláss meira í ár enn í fjør.

# Um Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið og feløgini annars

Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar. Felagið arbeiðir fyri, at føroyskt vinnulív hevur teir bestu møguleikarnar at kappast, mennast og virka. Við samráðingum og sáttmálum tryggjar Arbeiðsgevarafelagið samstundis góðar og støðugar arbeiðsmarknaðar-karmar fyri vinnuna.

Í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru føroyskar fyritøkur umframt arbeiðsgevarasamskipanir limir. Arbeiðsgevarasamskipanirnar eru Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðju-felag, Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum og Reiðarafelagið fyri Farmaskip. Fyritøkur, sum ikki hoyra til virkisøkini hjá arbeiðsgevarasamskipanunum nevndar omanfyri, hava beinleiðis limaskap í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag:

- **Felags sáttmálum fyri vinnuna:** Vegna vinnuna ger Arbeiðsgevarafelagið sáttmálar við løntakarafeløgini. Hesir tryggja støðug viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og tálma lønarvøkstur í mestan mun.
- **Ráðgeving og tænasta:** Felagið veitir limum sínum ráðgeving og tænastur á ymiskum økjum: starvsfólkaviðurskifti og leiðsla, sáttmálar, lógir og reglugerðir á vinnuøkinum v.m. Eisini virkar umsitingin sum sambindingarlið við vinnu í øðrum londum.
- **Vinnupolitiskum kørmum:** Vegna vinnuna verður arbeitt við at ávirka allar lógir, kunngerðir og ásetingar annars, sum landsstýri, løgting, umsiting, stovnar og kommunur seta í verk, soleiðis at hesar tæna og ikki darva vinnuni. Vinnufeløgini eru m.a. umboðað í nógvum ymiskum nevndum, ið seta karmar fyri føroyska samfelagið og framtíð okkara.
- **Kunning:** Arbeiðsgevarafelagið veitir kunning um privatu vinnuna, vinnulig viðurskifti og tann týdning, vinnan hevur fyri samfelagið, bæði beinleiðis og gjøgnum føroyskar miðlar.
- **Fundir og orðaskifti í vinnuni:** Felagið hevur átikið sær leiklutin at vera miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti. Skipað verður fyri ymiskum tiltøkum, har bond verða knýtt millum leiðarar í privatu vinnuni - eisini tá húsið er karmur um vitjanir uttaneftir.

Lógir og virðisgrundarlagið hjá felagnum eru lýst nærri á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

Nevnd Føroya Arbeiðsgevarafelags verður vald á árliga aðalfundinum. Í lógunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur, at nevndin skal veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag. Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum av Vinnuhúsinum. Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreina-feløgunum, sum húsast saman í Vinnuhúsinum.

## Hvør húsast í Vinnuhúsinum?

Í dag eru 14 virkin feløg undir sama taki í Vinnuhúsinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta hugsan, at tað hevur týdning at savna føroyska vinnu undir einum taki. Hetta fyri at føroyska vinnan skal hava sterkari samleika í samfelagnum gjøgnum felags umboðan.

**Arbeiðsgevarafeløgini eru:**

| Arbeiðsgevarafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Føroya Arbeiðsgevarafelag | Marita Rasmussen |
| Føroya Handverksmeistarafelag (íroknað Havnar Handverksmeistarafelag) | Marius Thomassen |
| Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum | Esther Dahl |
| Føroya Prentsmiðjufelag | Esther Dahl |
| Reiðarafelagið fyri Farmaskip | Esther Dahl |

Høvuðsuppgávan hjá arbeiðsgevarafeløgunum er at føra sáttmálasamráðingar við fakfeløgini vegna limirnar og at ráðgeva limunum í sáttmálaspurningum.

Harafturat arbeiða arbeiðsgevarafeløgini eisini við arbeiðsmarknaðarmálum og yvirskipaðum vinnukørmum.

**Vinnugreinafeløgini eru:**

| Vinnugreinafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Havbúnaðarfelagið | Niels Winther |
| Føroya Ráfiskakeyparafelag | Niels Winther |
| Handilsvinnufelagið | Birita Johansen |
| KT-felagið | Marius Thomassen |
| Oljuvinnufelagið | Jórun Gardar |
| Samskifti | Jórun Gardar |
| Ráðgevarafelagið | Marita Rasmussen |
| Ferðavinnufelagið | Birita Johansen |

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri teirra vinnugrein.

Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

## Føroya Reiðarafelagið og Felagið Nótaskip

Seinastu árini hevur Felagið Nótaskip húsast í Vinnuhúsinum og frá 1. mai 2013 eisini Føroya Reiðarafelag.

# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag setur karmarnar fyri arbeiðnum í Vinnuhúsinum.

Í nevndini sita:



## Bergur Poulsen, formaður

Bergur Poulsen er nevndarformaður og nevndarlimur í fleiri fyritøkum í føroyskum vinnulívi. Bergur Poulsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



## Høgni Hansen, næstformaður

Høgni Hansen er stjóri í heilsølufyritøkuni Poul Hansen. Høgni Hansen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011 og sum næstformaður felagsins síðan tá. Høgni Hansen hevur eisini verið nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið.



## Kristoffur Laksá, nevndarlimur

Kristoffur Laksá, er nevndarformaður í Fiskaaling. Kristoffur hevur í mong ár havt ábyrgdina og leiðsluna av sáttmálasamráðingunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, umframt at hann eisini hevur sitið í nevndini í Føroya Prentsmiðjufelag í mong ár. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



## Jón Sigurdsson, nevndarlimur

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Jón Sigurdsson hevur verið nevndarlimur í Føroya og Havnar Handverksmeistarafelag umframt er nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.



## Atli Gregersen, nevndarlimur

Atli Gregersen er saman við øðrum eigari av fyritøkunum Luna, Fútaklettur og Fiskavirkinum. Atli Gregersen er stjóri í alifyritøkunum Luna og Fútaklettur. Atli Gregersen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011. Atli Gregersen er eisini nevndarlimur í Havbúnaðarfelagnum.



## Fróði Magnussen, nevndarlimur

Fróði Magnussen er stjóri á tøknifyritøkuni Formula, harumframt undirvísir Fróði Magnussen í Vinnubúskapi og Strategi á HD/bachelor á Føroya Handilsskúla. Fróði Magnussen hevur verið formaður í KT felagnum og er framvegis nevndarlimur har, umframt í øðrum føroyskum fyritøkum. Fróði Magnussen hevur sitið í nevndini fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.



## Bogi Jacobsen, nevndarlimur

Bogi Jacobsen er stjóri í framleiðslu og útflutningsfyritøkuni Varðin Pelagic. Harumframt er Bogi Jacobsen nevndarlimur í P/F Varðin og P/F Fossá. Bogi Jacobsen hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY